Nr. 29 | Desember 2016

# MIÐ & MAGN

## Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið



Tema:

## Trygd á sjónum

Brúk fyri fleiri trygdarátøkum

Tað ber væl til at minka vanlukkutalið

---

Tillagað starv gevur Eyðuni innihald

Manningarfeløg spældu trumfin út

Umboðsráð skal veljast í Ognarfelagið í LÍV



Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum og limur í blaðnevndini við ábyrgd av blaðnum.

# Trygd og hvílitíð

Møði hjá sjófólki orsakað av ov lítlari samanhangandi hvíld kann vera orsøk til óhapp og vanlukkur. Tað vísti kanningin, sum sálarfrøðingurin Annbjørg á Høvdanum legði fram á Sjómannadøgunum í Klaksvík í august. Hon kundi eisini staðfesta, at føroyskir sjómenn verða nógv oftari raktir av vanlukkum enn sjómenn í okkara grannalondum.

Í okkara grannalondum kann eitt fiskiskip við einari maskinu størri enn 750 KW ikki mannast við bara einum meistara, tí tá kunnu hvílitíðarreglurnar ikki haldast – heldur ikki, sjálvt um skipið hevur vaktfrítt maskinrúm, tí tilkallivakt verður ikki roknað sum hvílutíð.

Men í Føroyum verður givið loyvi at sigla við bara einum meistara.

At vera einsamallur maskinmeistari merkir, at hann ongantíð kann rokna við at vera heilt leysur av vaktini. Hetta kann vera ein týðandi stressfaktorur.

Maskinmeistarafelagið hevur fyri langari tíð síðani viðurkent, at møði hjá sjófólki orsakað av ov lítlari samanhangandi hvíld er ein týðandi orsøk til óhapp.

Tað hevði verið áhugavert at fingið at vita, hvussu Sjóvinnustýrið tryggjar sær, at hvíldarreglurnar verða hildnar umborð á føroyskum fiskiskipum, so at álvarsligar vanlukkur ikki henda vegna vantandi hvíld.

Páll Hansen

**Páll Hansen**
formaður í Maskinmeistarafelagnum

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út felag.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**Blaðnevnd**
Páll Hansen, ábyrgd
Annfinnur Garðalíð
Jóan Petur Patursson
Elias Zachariassen

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Tel 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Føroya Skipara- & Navigatørfelag**
Smærugøta 9 A
Postboks 248
110 Tórshavn
Tel 31 69 73
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**Blaðhald**
Tey sum ynskja at halda MIÐ & MAGN, kunnu boða frá hesum í teldupost til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,- kr. um árið; t.e fyri 4 bløð

**Endurgeving**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

**Forsíðumynd**
Grækaris Djuhuus Magnussen

**Umsiting og redkasjón**
Press: press@press.fo
Øssur Winthereig, ossur@press.fo
Tel 21 84 86
Ingolf S. Olsen, ingolf@press.fo
Tel 22 50 77
Grækaris D. Magnussen, grakaris@press.fo
Tel 51 44 44

**Umbróting:**
Estra

**Prent og liðugtgerð:**
Estra 478500

Upplag:1700

# INNIHALD



Síða 4



Síða 8



Síða 14



Síða 28


**4 Tillagað starv gevur lívsinnihald**
Eyðun Hansen gjørdist sjómaður longu sum 14 ára gamal.

**8 Brúk fyri fleiri trygdarátøkum**
Annbjørg á Høvdanum hevur gjøgnumgingið tøl frá Vanlukkutryggingarráðnum gjøgnum eitt 40 ára tíðarskeið.

**14 Tað ber væl til at minka vanlukkutalið**
Hugburðsbroyting og vilji – eisini vilji at brúka pengar – tað er tað, sum krevst fyri at bøta um trygdina á sjónum.

**22 Fiskiskip somu trygd sum handilsskip**
Stendur tað til Maskinmeistarafelagið verða reglurnar fyri trygdini umborð á føroyskum fiskiskipum settar ájavnt við reglurnar fyri farmaskip.

**24 Ov lætt at fáa Bláu Bók**
Summir fiskimenn skuldu als ikki sloppið at mynstra, tí teir hava ov vánaliga heilsu.

**26 Hugburður um trygdarskeið longu broyttur**
Mótstøðan ímóti langa trygdarskeiðnum tykist vera munandi minkað.

**28 Manningarfeløg spældu trumfin út**
Føroysku manningareløgini hava boðið norðurlendsku systirfeløgunum at lata samráðingarrættin frá sær.

**32 Býta royndir og vitan um samráðingarrættin hjá navigatørum**
Tvær ferðir árliga verður skipað fyri norðurlendskari navigatørráðstevnu.

**34 Forsetaskifti í NMF**
Skeiðið hjá Páll Hansen er av.

**36 Umboðsráð skal veljast í Ognarfelagið í LÍV**
Í fyrru helvt av januar mánaði í 2017 verður umboðsráð valt í Ognarfelagið LÍV.

**38 Fakfeløg og tryggingartakarar eiga nú LÍV**

**44 Brennidepilin**
Hans Ingvard Joensen

**46 Føðingardagar**

# Tillagað starv gevur Eyðuni lívsinnihald

**Eyðun Hansen gjørdist sjómaður longu sum 14 ára gamal. Eftir mong ár á sjónum legðist hann uppi, og fór at koyra kranabil. Og so hendi vanlukkan, sum gjørdi hann avlamnan.**

TEKSTUR OG MYNDIR: **GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN** – PRESS

Tá eg komi inn á skrivstovuna hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag hendan dagin, eru tey trý á skrivstovuni. Formaðurin, Annfinnur Garðalíð, skrivstovukvinnan og bókhaldarin, Áshild Joensen, og so nýggi maðurin á skrivstovuni, Eyðun Hansen. Eyðun situr við telduna, og við sínum serligu amboðum trýstir hann dúgliga á knøttarnar – og tosar telefon samstundis. Hann er í ferð við at dagføra limalistan hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

## Stóran týdning

Eyðun Hansen er fegin um sítt nýggja arbeiði, nú hann er vorðin avlamin.



Uppgávan hjá Eyðuni Hansen er at dagføra limalistan hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag.



Eyðun Hansen er fegin um at hava fingið tillagað starv hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Her er hann avmyndaður saman við Áshild Joensen, skrivstovukvinnu.

– At eg havi fingið eitt tillagað starv hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur ófatiliga nógv at siga fyri meg. Eg havi sum uppgávu at dagføra limalistan. Her tosi eg við nógv fólk, eisini nógv, sum eg frammanundan kenni. Tað er óføra gott. Vit fáa mangan eitt gott prát, onkuntíð práti eg kanska í meira lagi, flennir hann.

– Men bara at koma ímillum fólk er gott, sigur Eyðun Hansen, sum gjørdist sjómaður longu sum 14 ára gamal.

## Jógvan á Gørðunum

57 ára gamli Eyðun Hansen er føddur og uppvaksin í Havn, men stóran part av vaksna lívi sínum hevur hann búð í Vestmanna – í 32 ár tilsamans.

Sum 14 ára gamal fóru ungi havnardrongurin fyri fyrstu ferð til skips. Tað var við Jógvan á Gørðunum í 1973.

– Eg orkaði ikki nógv tá, men eg var ikki ringur av sjóverki. Eg haldi, at eg hevði sjóverk í hálvtannað samdøgur, so var liðugt við tí, flennir hann.

Hann sigldi við Jógvan á Gørðunum í tvey ár, og fór so í læru sum bilmekanikari. Men tað tímdi hann ikki, og fór tískil aftur til skips. Hann var millum annað við einum av kubabátunum, Skúgvi. Síðan var hann eina tíð við einum trolbáti, áðrenn hann fór við Fame, sum fiskaði rækjur í Grønlandi. Ein hálvan túr vóru teir eisini í Barentshavinum, men teir fingu so lítið og brutu tí túrin av.

## Á skiparaskúla

Sum 20 ára gamal fór Eyðun Hansen á skiparaskúla. Tá var lívsleiðin løgd, hann skuldi vera sjómaður.

Tá hann var liðugur á skiparaskúlanum, fór hann fyrst við Suðurvarða og síðan við Vesturvarða. Eftir nakrar túrar fór hann við trolbátinum Vón. Fyrst í áttatiárunum fór hann í Eystursjógvin við trolbátinum Sólvá, sum Rúni Hentze var skipari á, og sum Sámal Jacobsen átti.

EYÐUN HANSEN:

## Bara at koma ímillum fólk er gott.

Tað var Vinjard Jacobsen, sum byrjaði fiskiskapin í Eystursjónum, og her forvunnu føroyskir trolbátar fitt av pengingi í eini tíggju ár.

Eyðun Hansen loysti onkuntíð Rúna Hentze av sum skipari á Sólvá.

– Tað var ein tíð, sum mær dámdi avbera væl. Vit forvunnu eisini nógv ta tíðina, sigur Eyðun Hansen.

## Við grønlendskum trolara

Tá hann hevði fiskað í Eystursjónum eina tíð, fekk hann kjans sum skipari á einum grønlendsk-



Eyðun nýtir serlig amboð, tá hann til dømis skal eta.

um rækjutrolara. Báturin var einar 28 metrar langur. Hetta var á heysti í 1984. Teir sigldu út frá Sisimiut, og tað gekk bara væl.

Síðan var hann við ymsum skipum, millum øðrum Grønanesi, sum stýrimaður og skipari. Her var hann við til eina ferð í 1993.

Tveir túrar var hann uppi í Loynikrókinum við skipum undir belisiskum flaggi. Hann var eisini stýrimaður og skipari við Fram. Teir fiskaðu gullaks, sild og makrel. Eftir hetta var hann mest undir Føroyum, til hann í 2007 legðist upp á land.

– Tá var eg komin so mikið til árs, at eg skuldi gera av, um eg skuldi halda fram á sjónum alt mítt vaksna lív, ella um eg skuldi finna upp á okkurt annað. Eg valdi so at keypa mær ein kranabil, og havi síðan arbeitt á landi, sigur Eyðun Hansen.

Síðani átti hann kranabilar í nógv ár.

## Vanlukka

Stutt áðrenn vanlukkuna hin 9. november í 2012 hevði hann keypt sær ein kranabil aftrat. Hann hevði so mikið nógv at gera, at nóg mikið var ikki við einum bili. Hann hevði nógv at gera – serliga við landing.

So er tað henda vanlukkudagin í november í 2012. Hann hevði verið eini arbeiðsørindi við kranabili í Kollafirði. Tá hann er liðugur at brúka kranan, skal hann okkurt smávegis annað ørindi, og gloymir at lora kranan niður.

Hann fer í bilin, og setur kósina ímóti Vestmanna – við krananum uppi. Og tað er, tá ið hann skal inn í Leynartunnilin, at vanlukkan hendir. Tá brestur kranin inn í tunnilsmunnan, bilurin snarar og buldrar inn í veggin. Ferðin er onkunstaðni millum 70 g 80 kilometrar um tíman.

– Eg haldi ikki, at eg misti vitið nakrantíð, kanska nøkur sekund, tað veit eg ikki rættiliga. Men tað var lutfalsliga skjótt, at fólk komu á staðið. Fyrstu løtuna helt eg meg vera kroystan fastan, tí eg fekk ikki rørt meg. Men orsøkin vísti seg skjótt at vera ein onnur, nevniliga at eg var lamdur, greiðir Eyðun Hansen frá.

Hann minnist, tá fyrsti maðurin kom til hansara. Hann bað hendan mannin haldi høvdinum upp, tí tað datt bara niður.

– Eg fekk ikki hildið høvdinum uppi, tí bað eg hann halda tí. Og tað gjørdi hann, heilt til sjúkrabilurin kom eftir mær, greiðir hann frá.

## Niður á Ríkissjúkrahúsið

Tá hann kemur á Landssjúkrahúsið, verður hann koyrdur í skannaran, og hann fær eisini heilivág

móti pínu. Tað einasta sjónliga, sum sást á honum, var ein lítil kúla í pannuni.

Tað varð skjótt greitt, at hann hevði brotið nakkan. Tískil var hann longu annan dagin eftir sendur niður á Ríkissjúkrahúsið við sjúkraflutningsflogfari. Hann kundi ikki fara við flogførunum hjá Atlantic Airways, tí tá hevði verið neyðugt at lyft børuna upp eftir enda, fyri at sleppa inn í flogfarið, og tað bar ikki til við einum brotnum nakka.

Á Ríkissjúkrahúsinum varð hann lagdur undir skurð. Hann varð eisini lagdur í respirator, tí lunguni vóru illa farin í vanlukkuni. Eftir at hava ligið á Ríkissjúkrahúsinum eina tíð, varð hann fluttur á Glostrup Hospital. Tá fekk hann ikki rørt armarnar. Av Glostrup Hospitali varð hann sendur til Hornbæk til uppvenjing í fimm mánaðir. Tað var avbera góð venjing, og hann kom seg eisini hampiliga væl.

Í dag er hann lamin í beinunum, og hann fær illa arbeitt við ørmunum. Men tað gongur kortini somikið, at hann kann arbeiða við teldum. Og hann hevur serliga framleidd amboð, sum hann til dømis nýtir, tá hann skal trýsta á telduknøttarnar, og tá hann etur.

Við venjingum vónar hann at koma seg upp aftur meira. Hann hevur júst fingið eina skurviðgerð, sum ger, at annar tummilin aftur riggar. Tað ger millum annað, at hann kann taka eina breyðflís í hondina.

Seinasta nýggja er, at vestmenningar hava fingið Eyðun Hansen at stilla upp til kommunuvalið (greinin er skrivað, áðrenn kommunuvalið). Og tað er hann ógvuliga spentur uppá.

## Formaðurin fegnast

Formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Annfinnur Garðalíð, er fegin um at hava fingið Eyðun Hansen á skrivstovuna.

– Vit fingu ein fyrispurning frá Almannaverkinum, um vit høvdu nakað arbeiði á skrivstovuni, sum Eyðun kundi taka sær av. Altso, at hann kom í eitt sonevnt tíðaravmarkað tillagað starv. Eg kom so at hugsa um stóra limalistan, sum trongir til at vera dagførdur, og so var avgerðin tikin. Og vit eru sera fegin um at hava Eyðun hjá okkum. Hann er júst rætti maðurin at taka sær av limalistanum, og tað gongur væl við arbeiðinum, sigur Annfinnur Garðalíð.



Eyðun er bundin at rullistólinum, tá hann skal flyta seg úr einum stað í annað á skrivstovuni.

# Brúk fyri fleiri trygdarátøkum

**Annbjørg á Høvdanum hevur gjøgnumgingið tøl frá Vanlukkutryggingarráðnum gjøgnum eitt 40 ára tíðarskeið, har hon roynir at lýsa mynstur og samanbera ymsar vandastøður umborð á føroyskum fiskiskipum.**

TEKSTUR OG MYNDIR: ØSSUR WINTHEREIG – PRESS

Í øllum londum er fiskivinnan ein vinna við nógvum arbeiðsvanlukkum. Men seinastu árini er talið á óhappum og vanlukkum minkað munandi.

Á ráðstevnu „Trygd á sjónum" í Klaksvík í august legði Annbjørg á Høvdanum, sálarfrøðingur, fram eina gjøgnumgongd av arbeiðsóhappum og vanlukkum hjá fiskimonnum seinastu 40 árini. Tølini eru fingin til vega við at gjøgnumganga tær fráboðanir, sum eru komnar til Vanlukkutryggingarráðið.

Vanlukkutryggingarráðið ger av, um ein fiskimaður hevur rætt til endurgjald eftir eitt arbeiðsóhapp ella eina arbeiðsvanlukku.

Annbjørg á Høvdanum stað-



Annbjørg á Høvdanum.

Framhald á næstu síðu >

festi, at hóast talið av óhappum og vanlukkum er minkað mundandi hetta tíðarskeiðið, er nógv eftir, sum kann gerast betri.

Talan er um átøk av ymsum slag, í lóggávuni, í mun til endurnýggjan av fiskiflotanum, um hugburð, kunning og upplæring.

Skaðar og vanlukkur eru lutfalsliga fækkað síðani 1994. Bæði tá hugt verður eftir ymsum skipasløgum hvør sær, og tá hugt verður eftir, hvussu skaðarnir hava rakt tey ymisku starvsheitini umborð.

## Annbjorg á Høvdanum legði fram granskingarúrslit um vanlukkur umborð á føroyskum fiskiskipum seinastu 40 árini.

– Eg haldi, at grundin til at vanlukkurnar eru blivnar færri seinastu 20 árini er, at umborð á flestu skipum eru trygdarátøk sett í verk, og serliga kravda trygdarskeiðið fyri allar fiskimenn hevur gjørt mun, segði Annbjørg á Høvdanum.

– Vit mugu halda áfram við trygdarátøkum, skráseta skaðar og gera kanningar við tí fyri eyga at læra av feilum okkara og málrætta trygdaátøkini, staðfesti hon í síni niðurstøðu.

## Fleiri vanlukkur umborð

Í tíðarskeiðnum 1972 til 2014 vóru 12.619 vanlukkur meldaðar til Vanlukkutryggingarráðið. Av teimum vóru 4.163 ella ein triðingur hendar á sjónum og 2.407 óhapp ella vanlukkur vóru fráboðarar frá fiskivinnuni. Hetta svarar til, at 27 prosent av øllum arbeiðsóhappum hetta tíðarskeiðið hendu í fiskivinnuni.

Síðani 1994 eru allir føroyskir fiskimenn skrásettir við mynstring, og síðani tá hevur borið til at talt arbeiðsóhapp í mun til hvussu nógvir fiskimenn vóru við føroyskum skipum, og hvussu nógvar dagar teir vóru á sjónum.

Annbjørg á Høvdanum vísti á, at arbeiðsvanlukkurnar á sjónum eru ein triðingur av øllum arbeiðsvanlukkunum, men tey, sum eru á sjónum, eru minni enn ein triðingur av teimum, sum eru í arbeiði tilsamans í Føroyum.

– Hetta tíðarskeiðið er fiskiflotin nógv moderniseraður, systematiseraður og effektiviseraður. Línuflotin hevur fingð egningarmaskinur, og skipini eru vorðin størri. Hetta hevur eisini merkt, at færri fiskimenn eru við føroysku fiskiskipunum, vísti Annbjørg á Høvdanum á. Kortini henda lutfalsliga fleiri vanlukkur umborð á fiskiskipum enn í landi.

### Fyribyrgingarráð:

- Takið ábyrgd
- Tryggið arbeiðsplássið – Haldið tað ruddiligt og syrg fyri, at alt er bundið fast.
- Verj teg sjálvan. Brúka hjálm, glíðitryggan fótbúna og statt ikki undir sveiggjandi luti.
- Har tað er møguligt, halt í gelendara, tá tú gongur.
- Lyft ikki nakað tungt einsamallur, um tit kunnu gera tað saman. Hav altíð rætta lyftistøðu.

*Úr faldara, sum Annbjørg á Høvdanum hevur gjørt*



Nógv fólk høvdu leitað sær til Klaksvíkar at lurta eftir fyrilestri um trygd á sjónum.




Annbjørg hevur gjørt tríggjar faldarar um grundleggjandi trygdarviðurskifti umborð á trolarum, langfaratrolarum og línubátum.

## Skaðar og vanlukkur

Tølini frá Vanlukkutryggingarráðnum hesi árini lýsa vanlukkutíttleikar og mynstur seinastu 20 árini.

Óhapp og skaðar eru eisini skrásett eftir, umborð á hvørjum skipaslag teir henda, og hvar á skipinum og nær teir hendu.

– Fiskivinnan í øllum londum er tann vinnan, har flest arbeiðsvanlukkur eru. Fyri at kunna fyribyrgja vanlukkur, so mugu vit kenna tær og skilja tær, segði Annbjørg á Høvdanum.

Í eini roynd at kunna fyribyrgja arbeiðsvanlukkum hjá fiskimonnum hevur Annbjørg á Høvdanum greinað vanlukkuupplýsingar hjá fiskimonnum í tíðarskeiðnum 1972 til 2014.

Í kanningini hevur hon eisini skrásett, hvussu nógvar dagar teir ymisku menninir umborð hava mynstrað hvørt ár. Hesi tølini eru gjørd síðani 1994, tá kravið kom um, at øll fiskiskip skuldu mynstra.

Tað vil siga, at síðani 1994; ber til at býta mynstringardagarnar á tey ymsu starvsheitini umborð, eitt nú, hvussu nógvar dagar kokkar, stýrimenn, maskinmeistarar hava verið umborð. Á tann hátt ber so eisini til at rokna út, hvussu óhapp og vanlukkur býta seg millum teir ymsu menninar og eftir, hvussu nógvar mynstringardagar teir hava havt. Somuleiðis ber til á tann hátt at samanbera millum ár.

## Brotnar brillur

Í hagtølunum hevur Annbjørg bæði talt materiellar og kropsligar skaðar. Eitt nú eru fleiri materiellir skaðar, har brillur hava fingið skaða. Vanlig sjúka er ikki við í kannigini.

Aldursbýtið av teimum, sum hava fráboðað skaðar til Vanlukkutryggingarráðið vísir, at flestu eru millum 30 og 59 ár. 11 prosent av skaðunum er meldaðar av fiskimonnum yvir 60 ára aldur. Hetta kemst av, at menn fara úr vinnuni, áðrenn teir koma í pensjónsaldur.

Hagtølini eru bert galdandi

## Deyðsvanlukkur umborð á føroyskum skipum







Nógv tær flestu deyðsvanlukkurnar í tíðarskeiðnum 1972 til 2014 hendu umborð føroyskum fiskiskipum. Hóast fleiri menn vóru við fiskiskipum, so heldur Annbjørg á Høvdanum, at tølini vísa lutfalsliga fleiri deyðsvanlukkur umborð á fiskiskipum.

Framhald á næstu síðu >

## Orsøkir til skaðar umborð




Flestu skaðarnir umborð á fiskiskipum henda, tí menn verða raktir av onkrum luti ella onkrum øðrum – eitt nú togverki ella veirum.

fyri menn umborð á føroyskum fiskiskipum.

Hagtøl eru ikki tøk á sama hátt fyri handilsflotan, men á ráðstevnuni legði Annbjørg nøkur tøl fram um vanlukkur í handilsflotanum.

Uppgerðin yvir skaðar umborð á fiskiskipum vísir, at nógv teir flestu skaðarnir henda á dekkinum.

Nógv teir flestu skaðarnir umborð á fiskiskipum standast av, at menn verða raktir av onkrum luti ella raktir av togverki ella veirum. Næstflestu skaðar koma av, at menn detta, og triðjflestir skaðar standast av, at menn verða kleimdir ella glíða.

Samstundis sæst, at nógv tann størsti parturin av skaðunum hevur við brillur at gera.

– Vit vita, at brillurnar sita á høvdinum, so vit kunnu vænta, at talan eisini hevur verið um sløg á høvdið, men tilmeldingarnar til Vanlukkutryggingarráðið snúgva seg um endurgjald fyri brillur, segði Annbjørg á Høvdanum.

Næst flestir skaðar vóru hetta tíðarskeiðið komnir á fingrarnar og síðani tennirnar.

### Deyðsvanlukkur

Ein partur av kanningini var at lýsa deyðsvanlukkur hjá føroyskum sjófólki. Her er sera stórur munur á handilsflotanum og fiskiflotanum. Nógv fleiri deyðs-

## Skaddur partur av likaminum




Total = 1.551
Ikki upplýst = 42

Flestu skrásettu skaðar hava við brillur at gera. Síðani eru tað skaðar á tenn og fingrar.

vanlukkur hendu umborð á fiskiskipum.

Annbjørg á Høvdanum gjørdi vart við, at tað ber ikki til at rokna deyðsvanlukkurnar út lutfalsliga fyri handilsflotan og fiskiflotan, men eftir hennara meting, so var eingin ivi um, at nógv fleiri deyðsvanlukkur henda umborð á fiskiskipum.

Lutfalsliga henda so nógv fleiri skaðar umborð á fiskiskipum, um samanborið verður við skaðar, sum restin av arbeiðandi fjøldini fær.

## Samanbering millum fiskimenn og fólk á landi




## Vanlukkur hjá maskinfólki 1994 til 2014

Talvan vísir, at vanlukkurnar hjá maskinfólkum eru fækkaðar síðani 1994. Tølini eru roknað, so at vanlukkurnar eru settar upp móti, hvussu nógvar dagar maskinmeistararnir hava verið mynstraðir. Á tann hátt ber til at samanbera millum ár. (Tølini á y-ásanum eru skaðafráboðanir pr. 100.000 manndagar til skips.)




## Vanlukkur hjá brúgvafólki 1994 til 2014

Skaðarnir hjá monnunum á brúnni á fiskiskipum eru fækkaðir munandi síðani 1994. (Tølini á y-ásanum eru skaðafráboðanir pr. 100.000 manndagar til skips.)









# SKEIÐ Á VINNUHÁSKÚLANUM

## VINNUHÁSKÚLIN

- BRM-skeið
- ERM-skeið
- Ship Handling
- Skeið í heilsulæru og endurnýggjan
- ARPA-skeið
- ECDIS-skeið
- Tecdis-skeið
- SSO-skeið
- § 16-skeið
- ISPS-skeið
- Endurnýggjan av vinnubrøvum
- Tankers Safety-skeið
- Flutningur av vandamiklum farmi
- Ketilpassaraskeið
- GMDSS-skeið
- LRC-skeið
- GOC-skeið og endurnýggjan
- DP Basic/induction
- DP Advanced/Simulator
- DP endurnýggjan
- AIS
- Tankers familiarisation
- Háspenningsskeið maskinmeistarar
- Háspenningsskeið maskinistar

## TRYGDARDEPILIN VIÐ ÁIR

- Eldsløkking umborð á skipi
- Endurtøkuskeið eldsløkking u.s.
- Sløkkileiðsla umborð á skipi
- Eldsløkking fyri skipsyvirmenn
- Endurtøka IMO 80
- Trygdarskeið grundleggjandi
- Trygdarskeið fult
- FRC-grundskeið
- Bátaførarskeið
- Medisinsk fyrstahjálp
- Stroppaskeið

Skeiðini eru sambært STCW-sáttmálanum við broytingum frá 2010.
Koturnar til skeiðini finnast á heimasíðu skúlans.

Vinnuháskúlin · Boks 104 · 110 Tórshavn
Tel 350 250 · info@vh.fo · www.vh.fo

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

SENDISTOVAN

# Tað ber væl til at minka vanlukkutalið

**Hugburðsbroyting og vilji – eisini vilji at brúka pengar – tað er tað, sum krevst fyri at bøta um trygdina á sjónum. Tað vóru panel-kjakarar um trygd á sjónum nøkulunda samdir um.**

TEKSTUR OG MYNDIR: INGOLF S. OLSEN – PRESS

Tað henda alt ov nógvar vanlukkur umborð á føroyskum fiskiskipum. Tað vóru panelluttakararnir samdir um, tá skipað var fyri kjaki um trygd á sjónum á Sjónám í Klaksvík í sambandi við ráðstevnuna um trygd á sjónum á Sjómannadøgunum í august.

Orsøkin til, at evnið varð tikið upp nú, var nýggja kanningin hjá sálarfrøðinginum Annbjørg á Høvdanum. Føroyar hava eina keðiliga rekord við lutfalsliga nógv flestum skaðum á sjónum samanborið við okkara grannalond. Sjálv kanningin er neyvari lýst í aðrari grein her á síðunum.

Kringvarpsjournalisturin Jón Brian Hvidtfeldt stýrdi kjakinum, og í panelinum vóru Pál Weihe, yvirlækni á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, Ragnar Ludvig, leiðari á Sjónám, Herálvur Joensen, stjóri í Føroya Reiðarafelag, Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, og Høgni Hoydal, fiskimálaráðharri.



Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

Framhald á næstu síðu >



Annbjørg á Høvdanum, sálarfrøðingur

## ISM-regluverkið

ISM-kotan (International Safety Management Code) er eitt regluverk, sum IMO (International Maritime Organization) hevur samtykt, og sum ásetir yvirskipaðar reglur fyri trygg-an skiparakstur. Øll skip omanfyri eina ávísa stødd í IMO-londunum skulu hava eitt sertifikat, sum prógvar, at tey lúka ISM-regluverkið.

Hetta mugu og skulu vit gera nakað við, var panelið á einum máli um, og í fyrsta lagi er tað ein hugburðsbroyting, sum skal til.

## Vánaligur hugburður

Annfinnur Garðalíð hevur royndir úr bæði handilsflotanum og fiskiflotanum og hevur siglt sum dekkari, kokkur og maskinmeistari og seinnu árini sum stýrimaður og skipari, áðrenn hann tók við formanssessinum í Føroya Skipara- og Navigatørfelag. Hann brúkti eina av sínum egnu upplivingum umborð á farmaskipi sum dømi um, hvussu illa statt tað kann vera við hugburðinum til trygd á føroyskum skipum.

– Einaferð vit lossaðu í Norra, fekk eg boð frá skiparanum um at fara niður í lastina at hjálpa til. Eg lat meg í hjálm, áðrenn eg fór niður í lastina, men tá eg var liðugur við arbeiðið og kom uppaftur, stendur skiparin fyri mær og spyr, hvat eg helt, at hasin hjálmurin gjørdi. Eg segði, at hann vardi meg fyri óhappi ella vanlukku, um okkurt skuldi komið niður í lastina í fríum falli. Nei, segði skiparin, hjálmurin ger, at tú seinkar arbeiðnum her umborð.

– Tí sigi eg, at tað sum skal til, er hugburðsbroyting, hugburðsbroyting og aftur hugburðsbroyting. Vit skulu hava eina null-hugsjón á sjónum, og tað skal verða eins sjálvsagt at fylgja trygdarásetingum umborð á skipum, sum tað er at spenna trygdarbeltið, tá vit seta okkum í bilin, segði Annfinnur Garðalíð.

Hinvegin hevði hann eisini verið við skipi, har alt var gjørt eftir bókini viðvíkjandi trygdini.

– Seinastu tíðina, eg sigldi í handilsvinnuni, brúktu vit eina ISM-skipan, sum er ein trygdarskipan við kekklistum, og tað má eg siga, at tað var eitt heilt fantastiskt upplivilsi at royna tað, segði Annfinnur Garðalíð.

## Oljuvinna er fyrimynd

Pál Weihe vísti á norsku oljuvinnuna sum fyrimynd, tá tað snýr seg um trygd á sjónum.

– Tað er ikki rímiligt, at vit blíva við at hava so vánalig vanlukkutøl. Summi siga, jamen soleiðis er náttúran, vit kunnu onki gera við tað, men eg sigi nei, vanlukkur kunnu fyribyrgjast. Men tað kostar at fyribyrgja vanlukkur, tað kostar í tíð, og tað kostar í pengum.

– Tað hevur oljuvinnan víst okkum týðiligt og greitt. Eftir Alexander Kielland-vanlukkuna í 1980 tóku norðmenn annað skinn um bak og innførdu ein strangan trygdarpolitikk. Hann kostaði nógv, men tey fingu nógv burturúr. Tað ber eisini til innanfyri fiskivinnuna, segði Pál Weihe.

– Í fyrsta lagi skal ein hugburðsbroyting til hjá øllum aktørum, ikki minst hjá teimum ungu, sum fara inn í vinnuna. Tí haldi



Pál Weihe, Annfinnur Garðalíð og Høgni Hoydal.

eg, at tey, sum fara umborð, skulu hava tríggjar vikur skeið í trygd og ikki sum nú bara nakrar fáar dagar, segði hann.

### Tríggjar vikur skeið

Pál Weihe var ikki einsamallur í panelinum at halda, at tað var skeivt at forða einari kunngerð hjá Rigmor Dam, mentamálaráðharra, seinasta vetur, sum ásetti trygdarskeiðini til tríggjar vikur fyrstu ferð.

Ragnar Ludvig helt lítið um politisku handfaringina av málinum.

– Skeiðið, sum var upp á tal at innføra í 2015, er ein Rolls Royce frá Fiskeriskolen í Danmark. Men tað var jarðlagt eftir fáum døgum í miðlunum – av politikarum. Man fór at snakka um tíð, um tað skuldi vera tríggjar dagar, fimm dagar ella 15 dagar. Tað bleiv tað største kjakevnið, í staðin fyri, at man spurdi, hvat tað er, vit vilja læra okkara sjófólk. Tað haldi eg vera ein stóran trupulleika, so har hava vit nógv at læra, segði hann.

Leiðarin á Sjónámi undraðist eisini á, at so nógv rok bleiv um at víðka trygdarskeiðið, so tað leyk krøvini í altjóða sáttmálanum um útbúgving innan trygd og vaktarhald á sjónum, STCW-F sáttmálanum, sum Føroyar eru partur av.

– Tað tekur seks mánaðir at blíva skipsatstøðingur til handilsskip, og ongin ger vrøvl um tað. Men við fiskiskipum er øðrsvísi, vit skuldu upp á 15 dagar, og tað bleiv tað rama skríggj – ikki bara millum sjófólk, men eisini á landi. Eg sigi ikki, at skeiðið skal vera júst 15 dagar, men vit góvu tí ikki ein kjans. Í staðin eru vit endað við einari kombinasjón upp á fimm dagar. Tað skal standa í sertifikatinum, men hvør skal viðurkenna tað? Tað verður ongastaðni viðurkent, bara í dunnuhylinum her, staðfesti Ragnar Ludvig.

Eisini Høgni Hoydal harmaðist lagnuna hjá gitnu kunngerðini.

– Eg skilji tó bæði sjónarmiðini – tað er keðiligt, at man dragnaði politiskt, men tað er eisini keðiligt, tá ein unglingi skal royna

PÁL WEIHE:

**Fiskimenn eiga at sleppa at pensjonerast, tá teir eru 60. Tað eigur at vera ein gestus frá samfelagnum.**

**Nú havi eg í 30 ár sitið í pensjónsnevndini í Føroyum og játtað avlamispensjón, og eg má siga, at eg havi sæð øgiliga nógvar menn, sum í aðru helvt á 50'unum geva upp at arbeiða á sjónum og siga, at nú orka teir ikki meira og fáa avlamispensjón. Tí teir eru niðurslitnir. Teir hava ymiskar trupulleikar í rørslulagnum, ilt í ryggi og akslum og so framvegis. Í ávísum pørtum av flotanum hevur tað í hvussu er til fyri stuttum verið so – sum vit hoyrdu mann greiða frá í morgun – at ein einstakur maður skuldi lyfta ekstremar byrðar, kanska upp á eini 80 kilo. Hasar har søgurnar vildi eg fegin fingið burtur, tí hatta er ein sovorðin kovboymentalitetur, sum ikki hoyrir til í einum væl skipaðum arbeiðsmarknaði.**

Framhald á næstu síðu >



Pál Weihe, yvirlækni á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu.

seg fyrstu ferð til skips, at hann so skal so leingi á skeið fyrst. Prísurin var eisini ein atfinning, tí tað er greitt, at eitt skeið á tríggjar vikur – 15 skeiðsdagar – kostar væl meira enn eitt skeið á tríggjar dagar. Men eg haldi, at vit kunnu og eiga at loysa henda trupulleikan, so vit uttan kostnað kunnu bjóða okkara ungu trygdarskeið á til dømis kvøldskúla og í 10. flokki.

## Ókeypis trygdarskeið

Tað sjónarmiðið hevði Pál Weihe eisini.

– Hví skal ein ungur maður absolutt gjalda fyri eina inngangstíð í eina vinnu sum fiskimaður? Eg havi sjálvur nomið mær vitan í nógv ár, og havi onki skula goldið fyri tað. Eg skilji ikki tankagongdina, at tað skulu vera pengar ímillum har, tá tað snýr seg um trygdarskeið, tí tað at verða fiskimaður í Føroyum er ein týdningarmikil samfelagstænasta, og fungerar tað ikki, sum tað skal, so kostar tað samfelagnum nógvar pengar, segði Pál Weihe.

Høgni Hoydal fekk ein spurning úr salinum, um tað ikki var eitt hugskot at brúka ein part av inntøkunum frá tilfeingisgjøldunum upp á at betra trygdina, millum annað eisini til trygdarskeiðini.

Fiskimálaráðharrin vildi ikki eyðmerkja pengar til serstøk endamál, men segði, at ætlanin sjálvandi var, at ein partur av øktum tilfeingisinntøkum eisini skuldi brúkast upp á at betra trygdina á sjónum.

PÁL WEIHE:

**Um eg skal siga tað eitt sindur akademiskt, so hava vit eitt tilfeingi her at veiða, sum tað sagtans ber til at veiða meira hóvliga, soleiðis at arbeiðsprosessirnar ikki verða so villar inn ímillum, at vit betala ein heilsuligan prís. Hesi her øgiliga stóru tøkini viðhvørt, tey hava sín prís.**

## Lóg um ábyrgdarbýti

Eitt er at hava trygdarskeið, annað er, í hvussu stórum álvara trygdin verður tikin umborð á okkara fiskiskipum. Her er tað rættiliga ymiskt frá veiðubólki til veiðubólk og frá skipi til skip, vóru fólk á einum máli um.

Ábyrgdarbýtið er ásett í greinunum 24, 25 og 25 í kapittuli 5 í lógini um trygd á sjónum – Løgtingslóg nr. 165 frá 21. desember í 2001:

**§ 24.** Reiðarin skal síggja til, at brek við skipi ella útgerð av týdningi fyri trygd, arbeiðsumhvørvi ella dálking, sum hann er vorðin kunnugur við, verða umvæld uttan drál.

**Stk. 2.** Reiðarin skal syrgja fyri, at skipið verður sýnað sambært galdandi reglum og hevur gildug loyvisbrøv.

*Stk. 3.* Reiðarin skal tryggja skiparanum umstøður at lúka tær skyldur, ið hvíla á honum.

**§ 25.** Skiparin skal síggja til, at skipið er í góðum standi til trygdar- og heilsuumstøður, og at arbeiðið umborð verður forsvarliga lagt til rættis.

*Stk. 2.* Skiparin skal síggja til, at allar innrættingar fyriskrivaðar til fyribyrging fyri havdálking, eru í góðum standi og kunnu nýtast til endamálið.

**§ 26.** Tann, ið stendur fyri arbeiðinum umborð, skal síggja til, at manningin er neyðturviliga vard



Pál Weihe, Ragnar Ludvig, Herálvur Joensen, Annfinnur Garðalíð, Høgni Hoydal og Jón Brian Hvidtfelt.

móti vanlukkum og heilsuskaða, og skal við leiðbeining og eftirliti tryggja, at arbeiðið verður gjørt á tryggan hátt við atliti til vanlukku- og heilsuvandan.

## Misjavnt lóglýdni

Jón Brian Hvidtfeldt spurdi teir báðar Annfinn Garðalíð og Herálv Joensen, hvussu væl teir hildu, hesar ásetingar vórðu fylgdar umborð á føroysku fiskiskipunum.

Annfinnur Garðalíð var fyrstur at svara.

– Eg havi uppliva tað, at reiðarar hava havt tað álit á mær, at eg uttan nakrar bindingar eri biðin um at sýna skip saman við einum sýnsmanni. Men so havi eg eisini upplivað tað, at reiðarin gevur boð um, at vit útseta, vit útseta, og vit útseta. Og so er tað útsett í so langa tíð, at tað heldur verður tikið næstu ferð, skipið skal klassast. Og so siglir tú kanska í útvið eitt ár við einum stórum breki við skipinum, til skipið einaferð verður klassað. Tað haldi eg vera øgiliga keðiligt, tí tað kann jú verða orsøk til nógv annað keðiligt, segði hann.

Beinleiðis spurdur, um hann tá sum skipari heldur lógina, svaraði hann:

– Nei, tað geri eg ikki – eg geri eftir reiðarans ordrum.

Herálvur Joensen helt, at allir reiðarar kendu ásetingarnar í lógini um trygd á sjónum.

– Teir kenna sær eisini ábyrgd, bæði av sínum skipum og av sínum fólki, og arbeiða út frá tí. Men sjálvandi eru ávísir partar av trygdarkrøvunum, sum eisini hava nakað við økonomi og tílíkt at gera. Tað kann gott vera, at tað onkuntíð verður útsett, til man skal til klassing ella á beding ella eitt ella annað kortini. Men grundleggjandi, ja, so taka teir støðuna í fullum álvara.

– Skiparin hevur eisini eina sjálvstøðuga ábyrgd, men allir partar skulu viðvirka til, at trygdin er í lagi, og eg haldi eisini, at í øllum reiðaríum, sum eru væl rikin, og sum hava fíggjarligar umstøður til tað, har verður ikki gingið upp á kompromis, segði Herálvur Joensen.

Hann segði, at tað eru flotabólkar, sum tíverri hava ligið tungt í sjónum eina tíð, og at tað setir nakrar avmarkingar.

Spurdur um hetta var eitt haldbart argument fyri ikki at halda lógina, svaraði stjórin í Reiðarafelagnum:

– Tað er ikki eitt argument fyri ikki at halda lógina, men pengar hava tann eginleika, at um tú ikki hevur teir, soført tú heldur ikki brúkt teir.

## Kendu ikki lógina

Ragnar Ludvig ivaðist í, hvussu væl føroyskir fiskimenn kenna ásetingarnar í lógini um trygd á sjónum.

– Ein flokkur á Vinnuháskúlanum var á Sjónámi fyri at læra okkurt um ISM og annað, og tá vísti eg teimum hesar paragraffirnar – 24, 25 og 26 – í lógini um trygd á sjónum. Teir høvdu ongantíð sæð tær fyrr. So hatta verður ikki lært nógv í skúlunum, og eg trúgvi enn minni, at eldri sjómenn av tí gamla skúlanum kenna til ásetingarnar.

– Men hatta har er líkasum grundarsteinurin í øllum hesum viðvíkjandi trygdini umborð, og mær dámar so væl mátan, tað er sett upp upp á. Eg haldi, at um ein fær hatta inn og veit, at hatta er tað fundamentið, vit standa á, og so arbeiðir út frá tí, so verður betri statt. Tí hatta er so væl orðað, tað tekur alt við – hatta er sum ein grundlóg um trygd umborð, segði hann.

Leiðarin á Sjónámi viðgekk, at ásetingarnar í lógini um trygd á sjónum kanska ikki fylla so nógv í pensum, tá fiskimenn koma á trygdarskeið.

Framhald á næstu síðu >

– Eg haldi, tað verður nevnt viðhvørt, men vit hava heilt fasta námsætlan, sum vit skulu fylgja – ein STCW-námsætlan, har tað eru settir tímar og minuttir á, hvussu tað skal undirvísast, segði hann.

## Reglur og váðameting

Ragnar Ludvig staðfesti, at tað ikki bert er viðvíkjandi trygdarskeiðnum, at fiskiskipini eru afturút samanborið við farmaskipini.

– Tað tekniska regluverkið fyri fiskiskip er ein lítlibeiggi hjá teknisku reglunum fyri farmaskip. Men regluverkið, sum er í handilsvinnuni, tað er uppfunnið. Tað ber til at hækka støðið.

– Vit skulu gera váðametingar á arbeiðsplássunum á sjónum, á fabriksdekkinum og á høvuðsdekkinum. Hetta snýr seg millum annað um trol og lemmar, stórar blokkar og veirar og aðrar tungar greiðir. Tað verður hugt ov illa eftir tí. So um vit fara inn og gera nakrar váðametingar og fáa lúkað út alt tað, sum kann elva til vanlukkuligar støður, og fáa gjørt mannagongdir hareftir, so fáa vit beinanvegin kvett nógvar av toppunum av tølunum í kanningini hjá Annbjørg á Høvdanum, segði Ragnar Ludvig.

## ISM

Annfinnur Garðalíð helt, at ein variantur av tí sonevnda ISM-regluverkinum – ella ISM-kotuni – eigur at gerast og setast í verk fyri fiskiskip.

– Í handilsvinnuni er ISM-kotan galdandi, og ein nýggjur maður umborð fær eitt pappírsark við spurningum, tá hann mynstrar. Hann skal svara upp á, hvat nummar kamarið hjá honum er, hvar nærmasta neyðútgongd er, hvar nærmasti eldsløkkjari er, hvar bjargingardraktirnar eru og so framvegis.

– Eg hugsi, at nógv av hesum kundi væl og virðiliga verið gjøgnumført umborð á einum fiskiskipi – at tú hevur ein standardformular, ein kekklista, at ganga eftir. Altso ein ISM fyri fiskiskip – ein ISM light. Eg veit eisini, at eitt føroyskt skip hevur roynt okkurt líknandi, segði formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

## Ov fáar venjingar

Hann fýltist eisini á, at tað verða gjørdar alt ov fáar venjingar umborð á fiskiskipunum.

– Tað veit eg av royndum, at tá tú mynstrar við fiskiskipi, og tað verður siglt, so tørna menn inn beinanvegin. Har er ikki tíð til nakrar venjingar. So verður kanska sagt, at vit gera tað seinni á túrinum, einaferð tá tað kanska verður ein slakk perioda. Men tá trolið er farið út, ella línan er sett, so tørna vit aftur inn. Og tá túrurin er liðugur, og vit eru lidnir at vaska, so tørna vit aftur inn. So var ongin venjing tann túrin, og næsti túrur er meinlíkur.

– Eitt hugskot til at gjørt hetta betri kundi verið, at regluligar venjingar vórðu gjørdar, áðrenn skipið yvirhøvur loysti – brandvenjing, venjing við MOB-báti og so framvegis, segði Annfinnur Garðalíð.

## Ráð fyri sjótrygd

Herálvur Joensen mælti fiskimálaráðharranum til at hyggja nærri at, hvussu Fiskeriets Arbejdsmiljøråd arbeiðir í Danmark.

– Um eg havi skilt tað rætt, so er tað eitt ráð, sum eisini hevur meira pedagogiskar uppgávur – sum er eitt millumlið millum myndugleikar og vinnu og heldur



Ragnar Ludvig, leiðari á Sjónám.



Herálvur Joensen, stjóri í Føroya Reiðarafelag.

fundir við aktørar í vinnuni, millum annað um hvat kann gerast fyri at menna tilvitanina um trygd. Tað kundi verið ein tanki ella eitt útspæl til tað, sum koma skal, nú landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at hann fer at kalla inn til fund um trygdarviðurskifti.

Høgni Hoydal tók tilmælið til sín, og fleiri – bæði panelluttakarar og fólk í salinum – talaðu fyri, at Føroyar fingu eitt sovorðið ráð. Eitt ráð fyri trygdina á sjónum, eins og vit hava Ráðið fyri Ferðslutrygd á landi.

## Tá vanlukkan er hend

Herálvur Joensen legði annars dent á, at hann tók undir við teimum, ið søgdu, at tað sagtans ber til at gera nakað fyri at fáa talið av vanlukkum á sjónum niður, men at tað eisini hevði týdning at hava eina góða krepputilbúgving, tá vanlukkur kortini henda.

– Tað ber til at gera nakað, men av og á henda tó vanlukkur, eisini deyðsvanlukkur, og tað hendir eisini tað umborð á skipi, at menn doyggja náttúrliga. í Reiðarafelagnum hava vit ofta tosað um, at vit áttu at havt onkra avtalu við ein sálarfrøðing, soleiðis at okkara reiðarí kunnu veita kreppuhjálp umborð í slíkum støðum. Tað, sum eg ítøkiliga havi fingið burtur úr at hava verið við her, er, at eg nú havi tosað við eina sálarfrøðistovu, og eg vænti, at vit í næstum fara at gera eina avtalu við nakrar sálarfrøðingar og boða okkara limafeløgum frá, at hendir ein vanlukka, so hava vit sálarfrøðingar tøkar at veita okkum tænastu, segði hann.

## Hugburðsbroyting

Kjakið vardi í meira enn tveir tímar, og nógv onnur evni viðvíkjandi trygd og vanlukkufyribyrging vóru uppi og vendu.

Men høvuðsboðskapurin, sum stóð eftir eftir kjakið, var, at hugburðsbroyting og størri tilvitan um trygd er tað týdningarmesta, sum skal til, um trygdin umborð á okkara fiskiskipum skal betrast og vanlukkutølini minka.

Tí vórðu panelluttakararnir at enda spurdir, um teir hildu, at tað var nóg mikið at dúva upp á hugburðsbroytingina, ella tað

HØGNI HOYDAL:

**Uttan mun til um vit eru á sjónum ella ikki, so vita vit, at havið er so vandamikið – ikki minst sum fiskimaður – at vit onkursvegna hava vant okkum við, at tað mugu henda ólukkur av og á. Men tað er ikki í lagi. Eg havi sjálvur havt tann hugburðin eisini, og tí var tað øgiliga gott at fáa hesi tølini á borðið sum eitt greitt skjalprógv fyri, hvussu støðan er. Hvat kann man so gera sum myndugleiki? Tað er vorðið samanborið við oljuvinnuna her, og uttan at kenna stórvegis til tað, so eru tað har øgiliga strang trygdarkrøv, arbeiðsumhvørviskrøv og krøv til heilsu og tílíkt. Og eg haldi ikki, at vit skulu seta ambisjónirnar lægri. Tað skal kanska gerast øðrvísi, men vit mugu ikki seta ambisjónirnar lægri.**



Fundarfólkið tók íðið lut í kjakinum um trygd á sjónum.

eisini var neyðugt við krøvum og øktum møguleikum at revsa, tá lógir og reglur ikki verða hildin.

Annfinnur Garðalíð helt, at tað helst eisini var neyðugt við lógarbroytingum fyri at minka um skaðarnar umborð á føroyskum fiskiskipum.

Pál Weihe legði dent á, at tá hann tosaði um hugburðsbroyting, so meinti hann ikki bert við, at hugburðsbroytingin skuldi henda hjá teimum, sum arbeiða umborð á skipunum.

– Hon skal eisini henda hjá myndugleikunum, hjá politikarunum, hjá øllum systeminum, har man sigur, at vit eru samd um eitt mál. Og tað ber til at náa, um vit vilja.

Ragnar Ludvig skeyt upp, at vit í størri mun fóru at brúka pensjoneraðar fiskimenn sum ráðgevarar í trygdarspurningum.

– Teir kunnu siga, hvat var gott og minni gott í teirra tíð, og sum pensjonistar eru teir kanska ikki so bangnir fyri at siga teirra meining. Annars skulu vit brúka galdandi regluverk og arbeiða við hugburði og tilvitan, segði hann.

Herávlur Joensen helt ikki, at tað føroyska lógarverkið var so langt afturút í mun til grannalondini. Hann endurtók sítt tilmæli um eitt arbeiðsumhvørvisráð og mælti annars til at arbeiða við hugburðsbroyting og størri tilvitan um trygd í vinnuni.

Høgni Hoydal staðfesti, at lógin um trygd á sjónum og regluverkið annars er bulurin, tá tað snýr seg um trygd á sjónum.

– Fyri at fremja hugburðsbroyting er henda áhaldandi granskingin og skjalprógvanararbeiðið, sum vit hava sæð verið lagda fram her í dag, sera týdningarmikið. Eg havi noterað mær øll uppskotini, um ISM, um arbeiðsumhvørvisráð og annað. Men eg ivist tó ikki í, at vit eisini fara at gera lógarbroytingar, bæði við støði í tí, vit sjálvi halda okkum hava tørv á, og við atliti til altjóða krøv, sum alla tíðina broytast. Hugburðsbroyting má hava nøkur amboð afturat sær, segði hann.



Høgni Hoydal, fiskimálaráðharri.

## MASKINMEISTARAFELAGIÐ:

# Fiskiskip somu trygd sum handilsskip

**Stendur tað til Maskinmeistarafelagið, verða reglurnar fyri trygdini umborð á føroyskum fiskiskipum settar ájavnt við reglurnar fyri farmaskip.**

TEKSTUR OG MYNDIR: INGOLF S. OLSEN – PRESS



Onki eigur at vera í vegin fyri, at somu krøv verða sett til trygdina á okkara fiskiskipum sum á okkara handilsskipum.

Tað heldur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, og vísir á, at orsøkin til, at farmaskipini í dag hava eitt hægri trygdarstøði enn fiskiskipini, er, at farmaskipini eru noydd at lúka altjóða krøv og standardir fyri yvirhøvur at kunna sigla millum lond, meðan tað í stóran mun eru okkara egnu nasjonalu reglur, sum regulera trygdina umborð á fiskiskipunum.

Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

– Vit hava í nógv ár havt tað sjónarmiðið, at trygdin á einum fiskiskipi skal verða á sama støði sum á einum handilsskipi. Gaman í eru lógarásetingarnar ymiskar millum hesar skipabólkar, men við góðum vilja og røttum hugburði eigur tað at lata seg gera, slær Páll Hansen fast.

## Mannagongdir

Á sjómannadøgunum í Klaksvík í august var ráðstevna um trygd á sjónum, har greining av skaðatilburðum hjá føroyskum sjófólki varð løgd fram.

– Eftir ráðstevnuna greiddi stjórin í Føroya Reiðarafelag frá í Kringvarpinum, at fleiri reiðarí longu høvdu orðaðar mannagongdir viðvíkjandi trygdini, og hetta er at fegnast um.

PÁLL HANSEN:

**Lógarásetingarnar eru ymiskar, men við einum góðum vilja og røttum hugburði eigur tað at lata seg gera, at hava sama trygdarstøði umborð á fiskiskipunum sum umborð á handilsskipunum, sigur Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum.**

– Men samstundis má havast í huga, at slíkar mannagogndir javnan mugu dagførast, og at tað er uppgávan hjá skiparanum, at reglulig kunning er um hetta umborð. Her havi eg eina kenslu av, at tað ofta manglar slík kunning umborð á føroyskum fiskiskipum, sigur formaðurin í Maskinmeistarafelagnum.

Hann heldur, at til dømis hjálmur, bjargingarvestur og trygdarstyvlar ella -skógvar, eiga at vera náttúrligur partur av klæðunum, tá fólk arbeiðir á dekkinum á einum fiskiskipi, og at øll fiskiskip skuldu havt ein orðaðan politikk fyri trygd, heilsu, trivnað og arbeiðsumhvørvi.

– Tað hevði eisini gjørt, at hesi evni gjørdust ein náttúrligur partur av gerandistosinum umborð, og hugburðurin hevði verðið hareftir. Dekkið á fiskiskipi er jú tað vandamiklasta arbeiðsplássið, vísir kanningin. Persónliga verndarútgerðin hjá hvørjum einstøkum sjófólki skal tí altíð vera í hásæti, sigur Páll Hansen.

Sum nevnt í aðrari grein, heldur hann, at landsstýriskvinnan í mentamálum skuldi havt hildið fast í upprunaligu kunngerðini um trygdarskeið, sum ætlanin var at lýsa í fjør vetur, og ikki sett longdina á skeiðnum niður úr 15 døgum í fimm dagar.

– Sum eg skilji, kendi hon seg vera undir politiskum og vinnuligum trýsti, men mær vitandi kallaði hon onki av manningarfeløgunum til hoyringar í málinum. So frá okkum kom so onki trýst, sigur Páll Hansen.

## Vantandi hvíld

Hann vísir á, at ein stórur vansi fyri trygdarstøðuna, heilsuna og trivnaðin umborð á fiskiskipunum er vantandi hvíld.

– Tað er umráðandi, at reglurnar um hvílitíð hjá sjófólki verða hildnar. Ymiskt er, hvussu skipabólkarnir eru, men eg trúgvi, at flestu fiskiskip, sum sigla í Føroyum í dag, halda ikki hvílitíðarreglurnar, sigur Páll Hansen.

Og tað skal hugsast um arbeiðsumhvørvið í síni heild og í øllum liðum, leggur hann dent á.

PÁLL HANSEN:

**Tað er umráðandi, at reglurnar um hvílitíð hjá sjófólki verða hildnar. Ymiskt er, hvussu skipabólkarnir eru, men eg trúgvi, at flestu fiskiskip, sum sigla í Føroyum í dag, halda ikki hvílitíðarreglurnar.**

– Atlitið til heilsu, trygd og umhvørvi eigur at takast longu, tá útgerð skal keypast til skipið. Tað er ikki óvanligt, tá útgerð verður tikin umborð til nýggjan túr, at tú sært dunkar av ymiskum slag fara umborð, har bæði følnað trø, deyður fiskur og skøltar standa á dunkinum. Slík evni hava onki at gera umborð á einum fiskiskipi, og hvørt reiðarí og ikki minst skiparin eiga at syrgja fyri góðum mannagongdum fyri innkeypi, soleiðis at slíkt ikki kemur fyri.

– Eisini eiga fiskiskip at hava til dømis rúsdrekka- og rúsevnapolitikk og mannagongdir tí viðvíkjandi, men enn havi eg ikki hoyrt um eitt einasta fiskiskip ella reiðarí, sum hevur nakað skrivað niður um hetta, staðfestir formaðurin í Maskinmeistarafelagnum.

# Ov lætt at fáa Bláu Bók

**Summir fiskimenn skuldu als ikki sloppið at mynstra, tí teir hava ov vánaliga heilsu. Kommunlæknar hoykna ov lætt undir trýstinum frá desperatum fiskimonnum, sum vilja hava Bláu Bók.**

TEKSTUR OG MYNDIR: INGOLF S. OLSEN – PRESS

Av sjálvsøgdum orsøkum er ein góð heilsa av stórum týdningi hjá einum mynstraðum fiskimanni, men eisini við atliti til trygdina hjá øllum umborð hevur tað stóran týdning, at hvør ein maður er væl fyri heilsuliga.

Men soleiðis er støðan verri enn so altíð umborð á okkara fiskiskipum. Tað kemur meira enn so fyri, at menn fáa heilsuváttan – Bláu Bók – og sleppa at mynstra, sjálvt um teir ikki hava heilsu til tað.

Tað kom fram undir kjakinum um trygd á sjónum í Klaksvík.

## Ov lætt

Tað var Hanus Hansen, reiðari, sum kom inn á evnið við einum fyrispurningi til Pál Weihe, yvirlækna.

– Tað er ov lætt at fáa Bláu Bók hjá summum, og tað er ein trupulleiki. Eg vænti ikki, at eg sjálvur hevði fingið Bláu Bók í dag, eg havi ein skaða, sum eg fekk umborð á trolara. Ryggurin er illa farin, og kanska er blóðtrýstið ov høgt eisini. Men tað eru nógvir menn, sum eru komnir upp í árini og eru útslitnir, sum eg haldi alt ov lætt fáa Bláu Bók. Og her hugsi eg bara um trygdina, segði hann.



Anfinn Olsen, formaður í Føroya Reiðarafelag: - Í summum førum er læknin í so lagaligur í metingunum, sum liggja til grund fyri hansara undirskrift.

Pál Weihe greiddi frá, at reglurnar fyri at fáa Bláu Bók eru rættiliga greiðar.

– Tað er ein listi við nógvum punktum, sum læknin skal út-

fylla. Men viðhvørt kann tað vera eitt sindur ringt hjá einum kommunulækna, sum er familjulækni hjá einum fiskimanni, og viðkomandi kemur og sigur, veitst tú hvat, um tú noktar mær Bláu Bók, so fari eg púra økonomiskt rabundus. Tá síggja menn meira villir út, enn tá man noktar teimum koyrikort.

– Hetta er ikki fyri at bera í bøtuflaka fyri nakran, sum hevur tikið eina skeiva avgerð fakliga sæð, men eg kann sagtans fylgja teimum læknum, sum fara ordiliga til markið og kanska yvir um markið, segði Pál Weihe.

## Eljustríð

Spurdur, um tað so ikki hevði verið best at latið aðrar læknar enn kommunulæknan skriva Bláu Bók, segði Pál Weihe, at tað júst var tankin, tá kravda heilsuváttanin kom fyrst í 1990-árunum.

– Men tað bleiv eitt eljustríð, og tað endaði so við, at tað skuldi vera hjá kommunulæknunum. Tað besta hevði helst verið, um færri læknar høvdu hesa uppgávuna – læknar, ið vóru vandir at standa ímóti, tá menn blíva ógvuliga fortørnaðir, tí teir ikki fáa Bláu Bók, segði hann.

Anfinn Olsen, formaður í Føroya Reiðarafelag, heldur grundleggjandi, at skipanin við Bláu Bók virkar væl, men ásannar eisini, at summir fiskimenn áttu ikki at fingið hana.

– Kravda heilsuváttanin virkar ógvuliga væl á tann hátt, at hon fær ein fiskimann at hugsa um sína heilsu, og hvussu hann livir. Tí góða heilsan er ein fortreyt fyri at sleppa til skips. Í so máta hevur Bláa Bók eina góða fyribyrgjandi effekt.

– Men í summum førum er læknin í so lagaligur í metingunum, sum liggja til grund fyri hansara undirskrift. Tað er sjálvsagt óheppið, men eg haldi tó, at tað vil skapa ov nógvar aðrar trupulleikar, um alt í staðin skal leggjast á ein ella tveir serlæknar í staðin fyri kommunulæknarnar, heldur Anfinn Olsen.




**Effo orkar betur**

Við okkara royndum, vitan og førleikum tryggja vit orku til húsarhaldini, stovnar og vinnuna. Kring landið hava vit bensinsølustøð og Fast-handlar. Skipini bunkra hjá okkum í best útgjørda terminali í Norðuratlantshavi. Og hvørja ferð eitt flogfar lyftir seg upp frá vøllinum í Vágum, hevur tað frammanundan tikið brennievni frá okkum.

effo føroya orkufelag

Tel 34 35 00 www.effo.fo

# Hugburður um trygdarskeið longu broyttur

**Mótstøðan ímóti langa trygdarskeiðnum tykist vera munandi minkað. Men tey flestu ynskja tó eina meira smidliga skipan, enn upprunaliga var lagt upp til.**

TEKSTUR OG MYNDIR: INGOLF S. OLSEN – PRESS

Tað elvdi til ikki sørt av rumbli, tá Rigmor Dam, mentamálaráðharri, fyri einum ári síðani ætlaði at lýsa eina nýggja kunngerð, sum longdi lógarkravdu trygdarskeiðini úr trimum døgum í tríggjar vikur – 15 skeiðsdagar. Leisturin var hin sami, sum verður praktiseraður í Danmark, men ikki sum í Noregi og Íslandi, har trygdarskeiðini eru væl styttri.

Politikarar, umboð fyri manningarfeløg og ikki minni reiðarar og fiskimenn vóru á gosi. Skeiðið var alt ov langt og alt ov dýrt, var hildið.

Harða mótstøðan gjørdi, at landsstýriskvinnan ongantíð lýsti ta kunngerðina, og í staðin var



Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum: – Trygdarskeiðið skal vera tríggjar vikur.

ein onnur kunngerð, har trygdarskeiðið var barberað niður í fimm dagar, lýst í juni í ár.

Men nú tykist mótstøðan ímóti tí upprunaligu kunngerðini munandi linkað.

Tað kom millum annað fram undir kjakinum um trygd á sjónum á Sjómannadøgunum í Klaksvík í august.

## Trygd fram um alt

Formenninir í teimum trimum manningarfeløgunum halda allir, at trygdin umborð á fiskiskipunum sjálvsagt eigur at takast fram um øll onnur atlit.

Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, heldur, at trygdarskeiðið eigur at ásetast til tríggjar vikur, júst sum í upprunaligu kunngerðini og uttan møguleika fyri fráviki.

– Tann kunngerðin tók støði í STCW-F-sáttmálanum, sum Føroyar eru partur av, og honum eiga vit sjálvsagt at fylgja, sigur hann.

Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, var í panelinum á kjakfundinum, og hann ávaraði ímóti at ganga upp á kompromis við trygdarskeiðnum.

– Sambært STCW-F-sáttmálanum er trygdarskeiðið bygt yvir fýra kotur, sum taka sína tíð. Fyrstu ferð, trygdarskeiðið verður tikið, tekur tað tríggjar vikur, men síðani, tá tað skal endurnýggjast, tekur tað væl minni tíð. Hví skulu vit spara upp á hetta, tá hetta er lívsgrundarlagið hjá okkara fiskimonnum, spurdi hann.

## Smidlig freist

Annfinnur Garðalíð heldur tó, at tað eigur at bera til at finna eina smidliga skipan, sum bæði livir upp til ásetingarnar í STCW-sáttmálanum og tekur atlit til serliga tørvin í føroysku fiskivinnuni.

– Tað kundi verið gjørt við, at ein freist verður sett inn í kunngerðina, soleiðis at trygdarskeiðið skal vera tikið í seinasta lagi til dømis 180 ella 90 dagar eftir fyrstu mynstring, treytað av, at allir ella næstan allir av restini av manningini hava gyldugt trygdarskeið. Tá ber til hjá einum ungum manni ella kvinnu at fara ein túr ella nakrar túrar til skips fyri at royna tað, uttan at skula brúka eina rúgvu av pengum og tíð upp á tað, sigur Annfinnur Garðalíð.

Neyvt somu støðu hevur Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag.

– Trygdin skal sjálvsagt takast fram um alt, men vit mugu hava eina skipan, sum ikki fullkomiliga steðgar rekrutteringina til flotan. Tað má eisini bera til at gera, sigur hann.

## Óhóskandi

Anfinn Olsen, formaður í Føroya Reiðarafelag, heldur tó upprunaligu kunngerðina vera ov stranga og óhóskandi til okkara fiskiflota.

– Hon útilokar møguleikan hjá ungum fólki at royna, um sjólívið er nakað fyri tey. Men vegurin fram er at fáa undirvísing í sjótrygd í skúlanum. Tað er fínt í fyrstu syftu. So kundi man kanska seinni komið við einari áseting um, at eitt fullfíggjað trygdarskeið, sum tað í upprunaligu kunngerðini, skuldi takast, áðrenn ein ávísan aldur. Men tá má eisini vera ein rímilig og smidlig innkoyringstíð, sigur hann.

Undir kjakinum í Klaksvík segði fiskimálaráðharrin, at hann er fyri at fáa trygdarskeiðini inn í skúlan, sum eitt ókeypis tilboð í 10. flokki og í kvøldskúlunum.



# Manningarfeløg spældu trumfin út

**Føroysku manningarfeløgini hava boðið norðurlendsku systirfeløgunum at lata samráðingarrætin frá sær, tá tað snýr seg um føroyskt skrásett skip úr hinum Norðurlondunum. Endamálið er at fáa strika Merkið av FOC-listanum hjá ITF. Málið verður tó neyvan viðgjørt fyrr enn tíðliga næsta ár.**

TEKSTUR OG MYNDIR: INGOLF S. OLSEN – PRESS



Í enn einari roynd at sleppa av við spjaldringina av føroyska flagginum sum hentleikaflagg, FOC, hava tey trý føroysku manningarfeløgini nú boðið hinum norðurlendsku systurfeløgunum at taka yvir samráðingarrættin fyri føroyskt skrásett skip, har veruligi ognarskapurin er í einum av hinum Norðurlondunum.

Tað hendi, tá NTF (Nordiska Transportarbetarfederationen)

Kenny Reynold, formaður í sjómannadeildini hjá svenska SEKO, stýrdi NTF-fundinum.

Framhald á næstu síðu >



NTF-fundurin var hildin í Føroya Fiskimannafelag.

tíðliga í september helt ein av sínum regluligu fundum í Føroyum.

Í Føroyum er tað bara Føroya Fiskimannafelag, sum er limur í NTF, men manningarfeløgini í hinum Norðurlondunum eru limir, og tað eru somu feløg, sum í 2011 kravdu føroyska flaggið skrásett sum hentleikaflagg, FOC (Flag Of Convinience) í ITF (International Transport Workers' Federation). Síðani hava tey hvørki verið til at høgga ella stinga í, tá Føroyar hava roynt at sleppa av aftur listanum.

**Kenny Reynold, formaður í sjómannadeildini hjá svenska SEKO var fundarstjóri, tí NTF-formaðurin Jan Villadsen ikki fekk verið við á fundinum. Kenny Reynold lovaði, at føroyska útspælið fór at fáa eina veruliga viðgerð á næsta regluliga NTF-fundinum, sum verður tíðliga næsta ár.**

## Støðan er broytt

Á fundinum í september, sum var hildin í Føroya Fiskimannafelag, slapp Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, og talsmaður fyri FMU, at greiða frá føroysku støðuni, sum er nógv broytt síðani 2011. FMU (Faroe Maritime Union) er samstarvsfelagið hjá teimum trimum føroysku manningarfeløgunum.

Annfinnur Garðalíð greiddi frá, at tað nú bert eru eitt ella tvey FAS-skrásett skip, sum hava trupult við at halda seg innanfyri mark, tá tað snýr seg um sáttmálar og manningarviðurskifti. Talan er um bareboat-leigað skip.

## Ongin avgerð í ár

Tað var týðiligt, at føroyska útspælið um at lata frá sær samráðingarrættin kom óvart á hini norðurlendsku manningarfeløgini, men tað var at síggja til væl móttikið.

**Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatør-felag, og FMU-tals-maður, greiddi frá føroysku støðuni á NTF-fundinum og beyð hinum norðurlendsku manningarfeløgunum at taka yvir samráð-ingarrættin fyri skip úr hinum norðurlond-unum, men sum eru skrásett í FAS.**

NTF-fundurin var tó rættiliga skerdur, tá tað kom til at taka stórar avgerðir, tí hvørki tey donsku ella tey íslendsku um-boðini fingu møtt. Danmark eigur í løtuni formannin í NTF – tað er Jan Villadsen formaður í flutn-ingsdeildini hjá 3F.

Tí fekk føroyska útspælið onga veruliga viðgerð á fundinum í Føroyum, men Kenny Reinold, formaður í sjómannadeildini hjá svenska SEKO, ið var fundarstjóri, lovaði, at málið fór at verða tikið upp til gjølliga viðgerð á næsta regluliga NTF-fundi, sum verður tíðliga næsta ár.

## Seinasta royndin

Endaliga avgerðin liggur tó hjá ITF.

Annfinnur Garðalíð sigur, at hetta helst verður seinasta royndin hjá FMU at fáa reinsað føroyska flaggið í ITF-høpi.

– Vit hava roynt alt annað, og eg dugi ikki at síggja, at vit hava fleiri skot í byrsuni. So má tað bera ella bresta. FMU kann liva við støðuni, sjálvt um tað sjálvandi er keðiligt fyri føroyska sjóvinnu, at okkara flagg verður stemplað sum hentleikaflagg, Men higartil hevur tað gjørt akku-rát tað sama, hvat vit so gjørdu – vit skuldu bara ikki av aftur list-anum, og eg dugi bara at síggja eina veruliga orsøk til ta støðuna, nevniliga proteksjonismu hjá hinum norðurlendsku feløgunum, sigur Annfinnur Garðalíð.

Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatør-felag, og FMU-talsmaður og FMU-talsmaður, legði fram tilboðið um, at føroysku mann-ingarfeløgini kunnu frásiga sær samráðingarrættin.



# TÚ RINGIR
# *VIT HEINTA*

**Ring 41 42 43**




KREA

## Gev spilloljuni nýtt virði

IRF

Víkarvegur 107 / FO-520 Leirvík / Tel 41 42 43 / irf@irf.fo / www.irf.fo

# Býta royndir og vitan um støðuna hjá navigatørum

**Tvær ferðir árliga verður skipað fyri norðurlendskari navigatørráðstevnu. Í august mánaði í ár var Føroya Skipara- og Navigatørfelag vertur fyri ráðstevnuni.**

TEKSTUR OG MYNDIR: GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN – PRESS

Á ráðstevnuni, sum rópt verður Nordisk Navigatørkongress, er høvið hjá umboðum fyri norðurlendsku navigatørfeløgini at skifta orð um felags áhugamál, loysnir og trupulleikar. Soleiðis var eisini á ráðstevnuni í hølum Føroya Skipara- og Navigatørfelags í døgunum 30.- og 31. august í ár.

Av tí at fleiri av luttakarunum úr hinum norðurlondunum skuldu víðari út í heim í arbeiðsørindum, gjørdist hendan ráðstevnan eitt sindur styttri og meira pakkað enn vanligt. Formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Annfinnur Garðalíð, er væl nøgdur kortini.

– Vit søgdu hvørjum øðrum, hvat er farið fram síðan seinast, vit hittust. Har varð millum annað tosað um sáttmálasamráðingar, og sjálvur tosaði eg um FOC (Flag Of Convinion), fundarvirksemið við ITF (International Transport Workers Federation) í Keypmannahavn og í London, og eg var eisini inni á lítla arbeiðsloysinum í Føroyum í løtuni, sigur Annfinnur Garðalíð.

Nomið var eisini við føroyska FAS, um hvussu nógv skip eru komin inn í skipanina, og hvussu nógv eru farin úr skipanini.

## Filipinaraskipan

Feløgini, sum vóru við á ráðstevnuni, vóru Søfartens Ledere, Danmark, Norsk Sjøoffisersforbund, Noreg, Félag Skipstjórnarmanna, Ísland, Finlands Skeppsbefälsförbund, Finland, og Sjöbefälforeningen-O, Svøríki.

Formaðurin í finska navigatørfelagnum, Johan Ramsland, tosaði millum annað um sonevndu filipinaraskipanina. Tað er ein skipan, har filipinskir yvirmenn fáa eina lægri hýru í finska handilsflotanum, enn finskir yvirmenn. Men kortini er talan um eina hýru, sum er at liva við. Johan Ramsland segði, at tað hevur verið trupult hjá finskum skipsførarum at fingið

**Formaðurin í svenska yvirmannafelagnum, Lennart Jonsson, tosaði um ætlanirnar við einari pensjónsnýskipan, og hvørja ávirkan hon hevur havt á limirnar higartil.**



Úr vinstru, Lennart Jonsson (Svøríki), Johan Ramsland (Finland), Annfinnur Garðalíð og høgrumegin situr fyrrverandi formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag í nógv ár, og núverandi nevndarlimur, Ellintur Abrahamsen.

neyðuga siglingstíð við finskum handilsskipum. Tí hava teir sett filipinaraskipanina í verk til finskar skipsførarar, so hesir kunnu fáa neyðugu siglingstíðina – við einari rímiligari hýru.

– Hetta hevur givið okkum fleiri skipsførarar, og allir partar eru væl nøgdir, segði Johan Ramsland.

## Svensk nýskipan

Í Svøríki fóru tey fyri nøkrum fáum árum síðan at tosa um eina pensjónsnýskipan fyri limirnar í svenska yvirmannafelagnum, sum bæði hevur navigatørar og maskinmenn sum limir.

– Hetta førdi við sær, at ekki kom á limir okkara, sum tá nærkaðust pensjónsaldri, tað vóru limir, sum høvdu eini fimm til sjey ár eftir á arbeiðsmarknaðinum. Nógvir teirra søgdu upp av ótta fyri at fáa eina verri pensjónsskipan. Tað hevur havt

**Johan Ramsland, formaður í finska yvirmannafelagnum, greiddi frá sonevndu filipinaraskipanini.**

við sær, at tørvur nú er á yvirmonnum, segði formaðurin í Sjöbefälsforeningen-O,Lennart Jonsson.

## Vandamiklir loðsleytarar

Ein av nevndarlimunum í Føroya Skipara- og Navigatørfelag bar upp á mál vandan við vánaligum loðsleytarum. Loðsleytarar eru gjørdir úr hampi. Vandin við tí er, at loðsleytarin kann síggja út at vera í fínasta lagi, men hampur hevur tað við sær, at hann rotnar innanífrá. Tí er tað meira enn so komið fyri, at loðsar og onnur, til dømis menn av vaktarskipum, eru komnir illa fyri av slíkum loðsleytarum.

Ellintur Abrahamsen mælti til, at farið verður undir at finna eitt annað og tryggari slag av loðsleytarum.

– Ellintur Abrahamsen hevur á fleiri slíkum ráðstevnum víst á hendan trupulleikan, og tað er okkara vón, at norðurlendsku feløgini vilja standa saman um at seta nýggj og øðrvísi krøv til loðsleytarar, sigur Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.

**Annfinnur Garðalíð, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, greiddi millum annað gestunum frá føroyska FAS.**

# Forsetaskifti í NMF

TEKSTUR: INGOLF S. OLSEN – PRESS. MYNDIR: MASKINMEISTARAFELAGIÐ

Seint í oktober hevði NMF (Nordiska Maskinbefälsfederationen) regluligan fund í Reykjavík, og tá legði Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, frá sær sum forseti, tí skeið hansara var runnið.

Nýggjur NMF-forseti er Guðmundur Ragnarsson úr Íslandi.

Á fundinum í Reykjavík løgdu umboðini úr limalondunum fram sínar landafrágreiðingar, og tey kundu øll fegnast um, at arbeiðsloysið hjá maskinmeistarum í Norðurlondum er at kalla onki. Heldur ikki í Noregi, har stórt skrædl annars er í oljuvinnuni. Har hevur tað víst seg, at maskinmeistarar, sum verða sagdir úr starvi í oljuvinnuni, heilt skjótt fáa starv á landi.



Fundarluttakararnir í Reykjavík. Úr vinstru er tað: Halldór Arnar Guðmundsson, Ísland, Páll Hansen, Føroyar, Odd Rune Malterud, Noreg, Sjúrður Heinesen, Føroyar, Guðmundur Ragnarsson, Ísland, Per Jørgensen, Danmark, Leif Wikstrøm, Finland, Robert Nyman, Finland, Gustav Schmidt Hansen, Danmark, Jan Rose Andresen, Danmark, Jóan Petur Patursson, Føroyar, og Mikael Huss, Svøríki.



Fráfarandi NMF-forsetin Páll Hansen, Føroyar, nýggi forsetin Guðmundur Ragnarsson, Ísland, og varaforsetin Per Jørgensen, Danmark.



Páll hevur handað Guðmundi fundarhamaran.




**Eik Banki P/F**, Tel. 348000
eik@eik.fo , www.eik.fo

Eik
Tað snýr seg um teg




**KSS** ER UMBOÐ FYRI **IBERCISA** Í FØROYUM, DANMARK, GRØNLANDI, SVØRÍKI, ONGLANDI, SKOTLANDI, ÍRLANDI, ÍSLANDI OG NORRA.

## FLEIRI FYRIMUNIR, LÆGRI KOSTNAÐUR

Eldrivnu spølini frá Ibercisa eru at finna umborð á yvir 120 trolarum kring heimin. Spølini hava fingið avbera góð ummæli. Spølini hava minni tørv á orku, og eru harvið bíligari í rakstri og meira umhvørvisvinarlig.





**Ynskir tú at hoyra meira um eldrivnu spølini?** Set teg í samband við okkum.

+298 472030 | KSS@KSS.FO | WWW.KSS.FO

KSS
KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ

# Umboðsráð skal veljast í Ognarfelagið í LÍV

**Í fyrru helvt av januar mánaði í 2017 verður umboðsráð valt í Ognarfelagið LÍV. Ein av uppgávunum hjá umboðsráðnum verður at velja tveir nýggjar nevndarlimir til LÍV-samtakið.**

TEKSTUR OG MYNDIR: **GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN** – PRESS

Ognarfelagið LÍV skal nú hava eitt umboðsráð. 35 limir skulu veljast í umboðsráðið, og høvuðsuppgávan hjá ráðnum verður at finna tveir nýggjar nevndarlimir til LÍV Holding, sum er høvuðsfelagið í LÍV. Fimm limir skulu veljast í nevndina.

Eftir at ognarviðurskiftini í LÍV eru broytt, eigur Ognarfelagið LÍV nú 50 prosent av felagnum (Ognarfelagið LÍV eru allir tryggingartakararnir), Fakfelagsbólkurin eigur 33,3 prosent (t.e. p/f Fakfelag við 17 fakfeløgum), og landsstýrið (Vinnumálaráðið) eigur 16,7 prosent av felagnum. Ætlanin er, at Fakfelagsbólkurin keypir tey 16,7 prosentini hjá landsstýrinum næstu 10 árini.

Nevndarformaðurin í Ognarfelagnum LÍV, Palli Petersen, sigur, at umboðsráðið verður valt fyrst í januar mánaði komandi. Umboðsráðið verður skipað við einum formanni, einum næstformanni og einum skrivara.

Í viðtøkunum fyri Ognarfelagið LÍV stendur í **grein 11, stk. 1:**

Atkvøðurætt hava øll, sum eru limir í felagnum og hava verið tað síðan tann seinasta 1. januar fyri valið.



Palli Petersen er nevndarformaður í Ognarfelagnum LÍV.

Nýggju eigaraviðurskiftini hjá LÍV eru nú komin í rættlag.



Stk. 2:
Allir limir, ið hava atkvøðurætt, hava minst eina atkvøðu og í mesta lagið átta atkvøður fyri allar teknaðar tryggingar.

Stk. 3:
Limir við teknaðum tryggingum, har árliga tryggingargjaldið er minni enn 15.000 krónur hava eina atkvøðu. Fyri hvørjar byrjaðar 15.000 krónur í árligum tryggingargjaldi herafturat, fær limurin eina atkvøðu, og fyri hvørjar byrjaðar 150.000 krónur í samanspardum virði á tryggingum við ársenda, hægri enn 150.000 krónur, fær limurin eina atkvøðu, upp til í alt átta atkvøður.

Sambært lógunum verður aðalfundur hjá LÍV í apríl mánaði, og áðrenn tað skal nývalda umboðsráðið hava skipað fyri nevndarvali. Ognarfelagið LÍV velur tveir limir í nýggju nevndina, Fakfelagsbólkurin velur tveir limir. Hesir skulu so í felag finna fimta limin, sum verður formaður í nevndini.

## Tríggjar eindir

Tá tú tosar við starvsfólk og onnur í LÍV, tosa tey um tríggjar eindir: LÍV 1, LÍV 2 og LÍV 3. LÍV 1 er LÍV Holding, sum altso er høvuðsfelagið. Her er talan um starvsfólk, umsiting og líknandi. LÍV 2 er aktiva tryggingarfelagið, sum teknar nýggjar tryggingar. LÍV 3 er passiva felagið, har fer ongin nýtekning fram. Felagið inniheldur bert eldri tryggingar, tað eru tryggingar, sum vóru teknaðar fram til og við 31. desember í 1999.





THOR in the midmost heart of the North Atlantic

THOR, based in Hósvík, a small village in the Faroe Islands was founded in 1994. Thor is a rapidly expanding shipping company with many years of experience in fishing and offshore work. Thor operates about 30 vessels, split 50/50 between Thor Offshore and Thor Fisheries. Six of our offshore vessels were purpose built in close co-operation with our customers in the marine seismic sector.

Our vessels operate worldwide, and are supported by highly experienced, efficient and flexible office personnel and crews. Our navigators, who are held in high esteem throughout the world, grew up in the midst of the North Atlantic and are no strangers to its wild weather, surging seas and powerful storms. Even though they are not intimated by the oceans they have a great respect for them.

THOR offshore is ISO 9001, ISO14001, OHSAS 18001, ISM certified; and is registered in Achilles FPAL system. Our modus operandi is safety first.

Bryggjan 5 · 420 Hósvík
Tel 422 503 · www.thor.fo

THOR

# Fakfeløg og tryggingar-takarar eiga nú LÍV

## Eftir drúgva tilgongd er komið á mál við nýggju ognarviður-skiftunum hjá størsta pensjónsfelagnum í Føroyum.

TEKSTUR OG MYNDIR: GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN – PRESS



Jan Jakobsen, stjóri í LÍV, fegnast um nýggju eigaraviðurskiftini í felagnum

LÍV, sum hevur tveir triðingar av samlaðu føroysku pensjónunum og pensjónstryggingunum, er nú ogn hjá tryggingartakaranum sjálvum og 17 av føroysku fakfeløgunum. Hetta var formliga undirskrivað av avvarðandi pørtum á samkomu í LÍV 1. september 2016.

Í dag eru tað sostatt tryggingartakararnir og tey 17 fakfeløgini í p/f Fakfelag, og landsstýrið, ið eiga LÍV. Ognarfelagið LÍV, sum umboðar allar tryggingartakararnar, eigur 50 prosent, p/f Fakfelag eigur 33,3 prosent og Føroya landsstýri eigur 16,7 prosent.

### Stórur dagur

Pætur Niclasen, formaður í p/f Fakfelag, segði millum annað á almennari samkomu í LÍV hósdagin 1. september:

– Hetta er ein stórur dagur fyri okkum 17 fakfeløg, ið eru við í keypinum av Føroya Lívstrygging. Hetta er største felags átak í føroyskari fakfelagssøgu nakrantíð. Ongantíð fyrr hava so nógv føroysk fakfeløg havt felags mið og mál. Hetta kann bert boða frá góðum.

– Hetta er ein gleðisdagur fyri okkum. Vit eru komin á mál við eini felagssak, sum vit hava arbeitt við í fýra og eitt hálvt ár. Nú, vit eru komin á mál, tími eg ikki at koma inn á allar tær forðingar, vit hava møtt á vegnum. Vit vilja heldur savna okkum um, hvussu keypið best kann gagna okkara limum og kundunum hjá LÍV.

– Føroya Lívstrygging er í dag eitt nógv gjøgnumskygdari felag

Framhald á næstu síðu >



Nógv fólk varð samankomið til hátíðarløtuna hjá LÍV.

enn fyri fýra og einum hálvum ári síðani, tá vit fóru í gongd við fyrireikingarnar til keypið. Vit vilja tryggja, at hetta er eitt eftirlønarfelag, ið bert hevur eitt endamál, sum er at røkja áhugamálini hjá teimum, sum eru í eftirlønaruppsparing hjá felagnum. Vit hava tryggjað, at hetta er eitt felag, ið bert hugsar um at geva eitt so gott avkast sum møguligt til tey, sum hava sína eftirløn í felagnum fyri lægst møguligt umsitingargjald.

– Her verður peningur ikki tikin úr felagnum sum vinningsbýti til ein triðja part. Vit hava tryggjað, at alt yvirskotið í felagnum kemur øllum kundunum tilgóðar. Vit hava tryggjað, at Føroya Lívstrygging fer at tryggja allar eftirlønaruppspararar í felagnum. Tað verður ikki gjørdur munur á limunum í teimum keypandi fakfeløgunum og limunum hjá øðrum fakfeløgum, segði Pætur Niclasen millum annað.

– Hetta er ein stórur dagur fyri limirnar í fakfeløgunum, segði Pætur Niclasen, formaður í p/f Fakfelag.

## Stóran týdning

Poul Michelsen, landsstýrismaður, vísti á týdningin, sum LÍV hevur havt tey mongu árini, felagið hevur virkað.

– LÍV hevur væl verið við í samfelagsbúskapinum, og hevur kunnað gjørt íløgur og hildið virkni í hesum samfelagnum. Felagið hevur eisini eggjað til tað haldføri, sum tørvur hevur verið á.

– Vit vita eisini tað, at heili 22 ár aftur í tíðina hevur politiska skipanin ynskt, at LÍV fekk eitt annað lív. Miðskeiðis í 1990-unum ynskti mann at fáa veðhaldspartin burturúr, og tað gingu nógv ár, áðrenn tað gjørdist veruleiki. Í 2006 gav landsstýrismaðurin so heimild til at einskilja tryggingarfelagið til Ognarfelagið LÍV við tí grundarlagnum, at tað vóru 50 prosent, sum blivu veitt sum beinleiðis gáva, og hini 50 prosentini vórðu býtt sundur, soleiðis at 33 prosent skuldu seljast beinanvegin, og fyri tað skuldu gjaldast 23,3 milliónir krónur. Hini prosentini skuldu so rindast næstu 10 árini. Og tað er her, vit eru í dag. Landsstýrið verður so við so leingi, LÍV heldur tað vera gagnligt, men ikki longur enn 10 ár fram í tíðina, segði Poul Michelsen millum annað.

Hann fegnaðist um, at tað hevur eydnast teimum 17 fakfeløgunum at semjast um keypið.

P/f Fakfelagð og Ognarfelagið LÍV fegnast eisini um, at tað við



hesum hevur eydnast at tryggja karmarnar fyri, at vit framhaldandi kunnu hava eitt føroyskt lívstryggingarfelag við dugnaligum starvsfólkum, sum virkar her heima, og sum eisini hevur atlit fyri, at partar av føroysku pensjónspengunum koma at virka í føroyska samfelagnum til gagns fyri bæði tryggingartakararnar og føroyska samfelagið sum heild.

Stjórin í LÍV, Jan Jakobsen, segði í sínari røðu hendan dagin millum annað:

– Pensjónsøkið er ein av týdningarmestu hornasteinunum í einum vælferðarsamfelagi. Tað hevur týdning gjøgnum arbeiðslívið í sambandi við tryggingar og er – ella eigur at vera ein týdningarmikil garantur fyri okkara búskaparliga frælsi eftir okkara arbeiðslív.

Hann vísti á, at politiska skipanin hevur seinastu 20-30 árini arbeitt við at fáa eina haldbara, álitisvekjandi og robusta pensjónsskipan. Og ein slík skipan eigur at byggja á seks grundarsteinar:

1. Skipanin eigur at byrgja upp fyri fátækraváganum á ellisárum.
2. Hon eigur at taka hædd fyri at býta lísvinntøkuna javnari.
3. Hon eigur at tryggja eitt fíggjarligt haldføri.
4. Hon eigur at eggja til, at fólk arbeiða so leingi sum tilber.
5. Hon eigur at eggja til, at fólk spara upp til eftirløn.
6. Skipanin eigur somuleiðis at byggja á tryggar politiskar karmar, sum skapa álit.

Tey 17 fakfeløgini í p/f Fakfelag, sum altso nú eiga 33,3 prosent (og sum seinni kunnu keypa upp í 50 prosent) av LÍV, eru Arkitektafelag Føroya, Bioanalytikarafelagið, Ergoterapeutfelagið, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Felagið Radiografar í Føroyum, Føroya Handverkarafelag, Føroya Musikklærarafelag, Føroya Pedagogfelag, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Fyrioterapeutfelag Føroya, Heilsuhjálparafelag Føroya, Heilsurøktarafelagið, Kost- og Føðslufelag Føroya, Ljósmøðrafelag Føroya, Maskinmeistarafelagið, S & K Felagið og Starvsmannafelagið.

Í nevndini í Ognarfelagnum Lív sita Palli Petersen, formaður, Jákup Danielsen, næstformaður, Gunnleivur Dalsgarð, Jógvan Ravnsfjall og Maria Húsgarð.



Rein góðska úr norður Atlantshavi

www.cig.fo









Norðhavnin 8 · Postboks 329 · FO-726 Ánirnar · Føroyar
Tel. +298 20 70 00 · Fax +298 20 70 10
T-postur: cig@cig.fo · www.cig.fo

## TÓRSHAVN, TANN 2. DESEMBER 2016

# Aðalfundarinnkalling

**Aðalfundurin hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag verður, mikudagin 28. desember kl. 10:00 í hølum felagsins, Smærugøta 9 A, Tórshavn.**

**Dagsskrá:**
A. Val av fundarstjóra
B. Frásøgn frá formanninum um virki felagsins í farna ári
C. Framløga og støðutakan til roknskapin
D. Val av nevndarlimum
E. Val av grannskoðara og tiltaksgrannskoðara
F. Ásetan av limagjaldi
G. Ymiskt

Osmund Justinussen er gestarøðari.

Hesaferð standa 6 nevndarlimir fyri vali.Um tú ynskir at velja við brævatkvøðu til nevndarvalið, so kanst tú venda tær til skrivstovuna á fsn@fsn.fo ella ringja til +298 316973.

Aðalfundurin byrjar kl. 10.00. Ein steðgur verður uml. kl. 12.00, tá atkvøðurnar frá nevndarvalinum verða taldar. Í døgurðasteðginum verður borðreitt við smyrjibreyði og onkrum drekkandi afturvið. Eftir fundin verður ein kaffimunnur.

Føroya Skipara- & Navigatørfelag gleðir seg, at síggja teg á aðalfundinum. Nevndin og starvsfólk ynskja tær og tínum kæru, eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár og vit takka fyri stuðul og gott samanhald í 2016.

P.S. Vit heita á teg, um at senda okkum tín teldupost bústað og fartelefon nummar til fsn@fsn.fo, so vit betri og skjótari kunnu samskifta og senda tær kunningarskriv.

Annfinnur Garðalíð, formaður

# Tíðindi frá Skipara- og Navigatørfelgnum

Annfinnur Garðalíð, formaður

## BROT ÚR DAGBÓK

**27-06-2016 LÍV**
Eykaaðalfundur í sp/f fakfelag.

**29-06-2016 Nærverkið**
Fundur millum FSN og Nærverk-ið.

**29-06-2016 PRESS**
Fundur millum FSN og PRESS.

**01-07-2016 Klintra**
Fundur millum FSN & Klintra (Journalskipan).

**04-07-2016 Flogskiparar**
Fundur millum FSN & Felagið Flogskiparar.

**05-07-2016 Starv**
Eyðun Hansen byrjaður í starvi hjá FSN.

**06-07-2016 Óli Samró**
Framløga av bókini hjá Óla Sam-róð (FSN).

**11-07-2016**
Nevndarfundur hjá FSN.

**13-07-2016 Fundur í FSN**
Kl. 10.00 var fundur í Hjálpar-grunninum fyri Óarbeiðsførar fiskimenn. ( 5-mannanevnd).

**18-07-2016 til 08-08-2016**
Summarfrí.

**11-08-2016**
**Blaðfundur**
Mið & Magn.

**15-08-2016 Fiskidagar**
Tingfundur um fiskidagar.

**17-08-2016 Trygd**
Framløga hjá Annbjørg á Høvd-anum um trygd umborð á skipi. Seinni um kvøldið pallborðsfund-ur.

**18-08-2016**
Fundur hjá Alfred Petersen.

**19-08-2016**
Fundur millum FSN – SF og um-boð fyri FMA.

**19-08-2016 Starvsmál**
Fundur um eitt starvsmál.

**29-08-2016 Søfartensledere**
Fundur við Søfartensledere á FSN.

**30-08-2016 Ráðstevna**
Nordisk Navigatørkongres í FSN.

**31-08-2016 NSOF**
Norsk Sjøofficer Forbund. NSOF hildið fund í FSN.

**05-09-2016 FMU**
Fundur í Faroes Maretime Union „FMU".

**06-09-2016**
Andakt á Vinnuháskúlanum.

**07-09-2016**
Blaðfundur.

**08-09-2016 Skansi**
Fundur millum FSN og Skansi – persónsmál.

**09-09-2016**
Fundur í VHS Maritima Útbúgv-ingarráðið.

**12-09-2016 FMU**
Fundur í FMU.

**15-09-2016**
Nevndarfundur í FSN.

**16-09-2016**
Fundur við Alfred Petersen.

**16-09-2016 Alt í land**
Fundur í Østrøm – ALT Í LAND.

**19-09-2016**
Fundur í FMU.

**20-09-2016**
Fundur í FSN. Hoyringsskriv.

**20-09-2016 Fundur í FSN**
Sáttmálasamanskrivingar. Mann-ingafeløgini & FR.

**21-09-2016**
Fundur í Vinnuhúsinum. Hoyr-ingsbólkurin.

**22-09-2016**
Hoyringsfundur í Kaffihúsinum. Johnny í Grótinum.

**23-09-2016 Fundur í FSN**
Hjálpargrunnurin fyri Óarbeiðs-førar fiskimenn.

**03-10-2016**
Ymiskir fundir um persónsmál.

**04-10-2016**
Fundur í Trygdargrunninum.

**06-10-2016**
Blaðfundur.

**10-10-2016**
Fundur í FSN millum FSN og FMR.

## Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum

Páll Hansen, formaður

**27-06-2016 Starvsmannafelagið**
Eykaaðalfundur í Sp/f Fakfelag, har uppskot til kapitalhækking varð lagt fram og undirskrivað. Sostatt fer Sp/f í søguna og P/f Fakfelag stovnað. Uppskot til nýggjar viðtøkur fyri felagið vóru eisini gjøgnumgingnar.

**06-07-2016 FSN**
Verkstova „Fiskiskapur" fjølbroyttar ásetingar. Óli Samró greiddi frá nýggju bókini, hann hevur skrivað. Bókin lýsir, hvussu fiskivinnan er skipað kring allan heim. Ein sera góð og greið framløga, vit fingu hendan dagin.

**15-07-2016 Fiskivinnuráðið**
Fundur í Fiskivinnuráðnum. Til viðgerðar var hoyring um broytingar í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. Meiningarnar vóru sera ymiskar, millum annað varð víst á, at tað er ikki góður lóggávusiður at lóggeva týðandi broytingar, sum hava afturvirkandi kraft. Annars varð mælt til, at ein umsitingarætlan verður gjørd fyri komandi árini, og at málini verða kend. MF vísti á, at tað er skilagott at draga inn óbrúktar fiskidagar og brúka ein part av hesum aftur sum buffara til bátar, sum eru virknir og mangla fiskidagar.

**08-08-2016 Vinnunevndin**
Hoyring um broytingar í vinnuligum fiskiskapi. Manningarfeløgini vóru innboðin. MF vísti til niðurstøðuna hjá felagnum í Fiskivinnuráðnum, og segði, at mann ikki hevði so sterka meining um prosent niðurskurð, tað lat mann politikararnar um.

**10-08-2016 FSN**
Mið og Magn blaðfundur. Tað var drúgt at fáa síðsta blað, umhugsa at skifta prentsmiðju, taka støðuna til næsta fund. Greinar til komandi blað vórðu umrøddar.

**26-08-2016**
**Parnassið-Hotel Hafnia**
Kunnandi fundur við øll fakfeløg, sum hava eina avtalu við Lív, men ikki eru við í keypinum. Umboð fyri P/F Fakfelag, Ognarfelagið Lív og stjórin í Lív greiddu frá um søluna, og hvørjar fyrimunir hetta gevur.

**30-08-2016 Smyril**
Fundur við maskinmeistararnar umborð á Smyrli, nú sáttmálasamráðingar skjótt byrja. Sera góður fundur, har vit fingu innlit í teirra gerandisdag, og uppskot um ymiskar broytingar, sum verða tiknar við til samráðingarnar.

**01-09-2016 Advokatskrivstovan**
Fyrrapartin. P/F Fakfelag møtti á advokatskrivstovuni at undirskriva skjøl í sambandi við yvirtøkuna av 50% av Lív. Seinnapartin: Lív yvirtøka.

**05-09-2016 MF**
Nevndarfundur í FMU. AG greiddi frá fundi í Nordisk Navigatørkongres, har hann hevði kunnað teir um samskifti við ITF viðv. FAS. Tosað varð um norsku skipini, og semja var um, at føroysku feløgini skulu frásiga sær rættin at gera sáttmálar fyri hesi skip og lata feløgini í upprunalandinum taka sær av hesum. Hetta ger mann við tey svensku og Íslendsku feløgini.

**06-09-2016 Smyril**
Fundur við maskinmeistararnar umborð á Smyrli og aðra manning. Góður fundur. Manningin hevði áleið somu uppskot sum vit móttóku á fyrra fundinum við hin partin av manningini.

**07-09-2016 FSN**
Fyrrapartin. Mið og Magn blaðfundur. Tosað varð nærri um komandi blað og hvørjar greinar skuldu við. Seinnapartin: Fundur í bólkinum um endurskoðan av FAS.

**09-09-2016 Vinnuháskúlin**
Maritima Útbúgvingarráðið. Til umrøðu var maskinmeistaraaspirantar og broyting av maritimu útbúgvingunum til BSc støði. Sera góð og positiv gongd í báðum málum.

**12-09-2016 MF**
Fyrrapartin: FMU fund um sjóvinnupolitikk og aldursmark av skipum, tá tey koma inn í FAS. FMU er av teirri meining, at 20 ára aldursmarkið skal varðveitast.
Seinnapartin: Fundur við umboð fyri Føroya reiðarafelag um trupulleikar, sum FOC hevur við føroyskum skipum.

**13-09-2016 Vinnuháskúlin**
Fundur í maritima arbeiðsbólkinum um Sjóvinnuútbúgvingar. Stjórin greiddi frá framtíðar ætlanum hjá skúlanum, og vit fingu sýnt fram nýggju simulatorarnar.

**16 -09-2016 Trygdargrunnur**
Fyrrapartin: Undirskrivað ymisk skjøl í sambandi við grunnin. Seinnapartin: Til móttøku hjá starvsmannafelagnum í sambandi við teirra nýggju hølir.

**19-09-2016 VMR**
Fundur í maritima strategibólkinum. Hesin fundurin var framhald av fundinum á vinnuháskúlanum.

**20-09-2016 FSN**
Manningarfeløgini og Reiðarafelagið møttust at skriva felags niðurstøðu í hoyringsskrivi um broytingar í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m. Arbeitt varð eisini við samanskriving av sáttmálanum.

**21-09-2016 Vinnuhúsið**
Fylgibólkurin í sambandi við nýskipanir av fiskivinnuni hittist at umrøða hoyringsskriv frá arbeiðsbólkinum. Tað spurdist ikki nógv burtur úr hesum fundi. Flestu luttakararnir vóru ímóti uppboðssølu. MF boðaði frá, at vit tóku ikki undir við 100% uppboðssølu.

**22-09-2016 Kaffihúsið**
Fundur millum nýskipanarbólkin og vinnubólkin, har hoyringsskrivið varð gjøgnumgingið. Fleiri spurningar vórðu settir, men tað vóru ikki líka nógv aftursvar. Samanumtikið kann sigast, at tað bert hava verið tveir hoyringsfundir í hesum stóra máli, og kjakið hevur ikki verið serliga konstruktivt.

**23-09-2016 MF**
Nevndarfundur. Kunnað varð um fund við Nýskipanarnevndina og at flestu feløg vóru ímóti uppboðssølu. MF hevði boðað frá, at vit tóku ikki undir við 100% uppboðssølu. Dagført upplegg til SSL-sáttmálan varð gjøgnumgingið saman við sjálvum sáttmálanum. Farið varð undir at skriva endaligt upplegg til samráðingar. Nakað av tosi var um núverandi fiskivinnupolitikk.



# Hans Ingvard Joensen

BRENNI-
DEPILIN

**Føddur:** 10.12.69

**Parlagsstøða:** Stakur.
Eigur døturnar Selmu og Emmu

**Útbúgving:** Maskinistur og maskinsmiður

**Starv:** 2. meistari við Jupiter

**Hvussu heldur tú útlitini vera hjá maskinmeistarum í dag?**
Slettis ikki so galið. Kortini sær tað ikki so gott út á sjónum í løtuni, men góður møguleiki at fáa arbeiði á landi.

**Hvør er størsta avbjóðingin hjá einum maskinmeistara?**
At hava alt koyrandi. Alt viðlíkahaldsarbeiði má gerast væl og virðiliga, so alt koyrir, sum tað skal. Tað skal eisini vera gott skil á pappírsarbeiðnum, alt skal skrivast niður í dag.

**Nær vart tú fyrstu ferð til skips og við hvørjum?**
Eg var fyrstu ferð til skips í 1984. Vit vóru undir Íslandi við Kúrberg. Vit royndu við snellu. Tað gekk rættiliga væl, fiskur var á dekkinum hvønn túr.

**Hvat hevur verið longsti túrur tín til skips?**
Tað eina tørnið var eg eitt ár burtur úr Føroyum, men vit landaðu kortini í Kanada millum túrarnar. Annars mann longsti túrurin hava verið tríggjar mánaðir úti við Hvilvtenni.

**Hvat gert tú í frítíðini?**
Skrúvi upp á bilar, og koyri motorsúkklu. Havi eina 1500 hk Kawasaki og eina 750 hk Kawasaki.

**Hvat slag av bili hevur tú?**
Toyota Landcruiser.

**Hvørja teldu hevur tú?**
Eina Dell.

**Hvør er besta bókin, tú hevur lisið?**
Lesi ikki so nógv. Men Grái Oktober og Blíð er summarnátt eftir Jógvan Isaksen dámdi mær væl.

**Hvønn tónleik/sang dámar tær best?**
Robbie Williams lurti eg nógv eftir. Har er alt gott, haldi eg.

**Hvør er besti filmur, tú hevur sæð?**
Hyggi rættiliga lítið eftir filmum, men actionfilmar dámar mær. HEAT dámdi mær væl, Robert de Niro spældi við.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum?**
Ærlig fólk, altso, fólk, sum siga sína meining. Um tað nívir eina løtu, ger minni. Og so at fáa vitjan av døtrunum, tað er deiligt.

**Hvat kann øsa teg í gerandisdegnum?**
At hoyra politikarar snakka eina rúgvu, men í veruleikanum onki siga, tað kann øsa meg.




# Lat okkum hjálpa tær at seta saman fíggjarliga trygdarnetið, so hongur tað ikki á tær

Kundin eigur LÍV. Vinningurin verður borin aftur gjøgnum góðar tryggingar, lágan rakstrarkostnað og eitt munagott avkast á pensjónsuppsparingini.

Kopargøta 1, Tórshavn | **www.liv.fo**

# FØÐINGARDAGAR

## MASKINMEISTARAFELAGIÐ:

| | | |
|---|---|---|
| Jóannes Andreasen, Tórshavn | 9/12-1946 | 70 ár |
| Andy Knudsen, Velbastaður | 3/11-1966 | 50 ár |
| Eljón Debes Johannesen, Oyri | 13/01-1967 | 50 ár |
| Poul Eiden Müller, Klaksvík | 15/01-1967 | 50 ár |
| Ronnie Samuelsen, Klaksvík | 15/12-1976 | 40 ár |
| Virgar Zachariasen, Sandur | 3/01-1977 | 40 ár |
| Hans Petur Olsen, Hoyvík | 15/01-1977 | 40 ár |
| Bárður Johanneson, Signabøur | 24/11-1986 | 30 ár |
| Bárður S. Patursson, Velbastaður | 8/12-1986 | 30 ár |

## SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAGIÐ:

| | | |
|---|---|---|
| Birgir Nielsen, Nesi | 11/12-1946 | 70 ár |
| Helgi Fossadal, Vestmanna | 2/11-1956 | 60 ár |
| Eyðun Johannesen, Froðba | 22/12-1956 | 60 ár |
| Magni Durhuus Olsen, Tórshavn | 14/11-1966 | 50 ár |
| Anton Egholm, Hoyvík | 14/11-1966 | 50 ár |
| Árni Johan Fossdalsá, Sandur | 20/11-1966 | 50 ár |
| Eirikur Magnussen, Trongisvágur | 24/11-1966 | 50 ár |
| Høgni Hansen, Oyndarfjørður | 4/12-1966 | 50 ár |
| Poul Jacobsen, Tórshavn | 5/12-1966 | 50 ár |
| Eyðun Anthoniussen, Toftir | 25/12-1966 | 50 ár |
| Pól Falkvard, Sørvágur | 27/12-1966 | 50 ár |
| Jógvan Joensen, Norðskáli | 15/1-1967 | 50 ár |
| Jóhan Vidtfeldt, Sandur | 9/11-1976 | 40 ár |
| Høgni Magnusson, Haraldsund | 16/12-1976 | 40 ár |
| Napoleon Sólbj. Vestergaard, Vágur | 22/12-1976 | 40 ár |
| Petur E. Debes, Miðvágur | 2/01-1977 | 40 ár |
| Fríði Danberg, Streymnes | 7/01-1977 | 40 ár |
| Sofus O. Poulsen, Leirvík | 7/11-1986 | 30 ár |
| Tummas Petur Bisp, Velbastaður | 28/11-1986 | 30 ár |
| Finnbogi Berg, Tórshavn | 10/12-1986 | 30 ár |

peturlarsen.fo

# FYRI TYKKUM
# HVØNN MORGUN

BAADER Food Processing Machinery · fomaco FOOD MACHINERY COMPANY · MOSCA STRAPPING SYSTEMS · euskan++ FISH HANDLING SYSTEMS

Petur Larsen Pf · Bakkavegur 8 · 530 Fuglafjørður · Tel 775 775 · pl@pl.fo

PETUR LARSEN
Since 1971

trygging.fo



Vit føra tína pensjón

# trygt í havn

**Sum limur í Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur tú møguleika frítt at velja, hvar tú ynskir at hava tína pensjóns-samansparing og lívstrygging.**



**Endamálið er at tryggja eina munagóða samansparing**, sum er við til at leggja lunnar undir eina framhaldandi vælferð, tá ið tú fert frá fyri aldur.

- Vit samanseta pensjón og tryggingar eftir tínum tørvi
- Vit umsita tína pensjón við størsta vinningi fyri eyga
- Umvegis Netpensjón hevur tú fult gjøgnumskygni

**Savnar tú tryggingar og pensjón hjá okkum, kanst tú fáa upp til 32% í avsláttri.**

**Hevur tú spurningar,** ella kundi hugsað tær betri frágreiðing, so set teg í samband við okkum á 345 700 ella betri@betri.fo

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR